BÚSKAPARRÁÐIÐ

**Várið**

# 2021

# Temafrágreiðing

## Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini

April 2021

Economic report from the Economic Council of the Faroe Islands, Spring 2021, with Summary in English

Redegørelse fra det Økonomiske Råd på Færøerne, forår 2021: Udsigterne for konjunkturudviklingen

# Innihald

**II 1 Inngangur: Eitt øðrvísi framhald av haldførisframrokningunum** ........ 2
**II 2 Eldraøkið** ........ 4
**II 2.1 Neyvari lýsing av heilsuhjálparum á eldraøkinum** ........ 8
**II 2.2 Neyvari lýsing av heilsurøktarum á eldraøkinum** ........ 10
**II 2.3 Neyvari lýsing av sjúkrarøktarfrøðingum á eldraøkinum** ........ 11
**II 2.4 Onnur viðurskifti á eldraøkinum** ........ 13
**II 2.5 Framtíðar tørvur á eldraøkinum fram til 2030, um støðið frá 2020 skal haldast** ........ 14
**II 3 Sjúkrahúsverkið** ........ 16
**II 3.1 Neyðugur fíggjartilvøkstur á sjúkrahúsøkinum fram til 2030, um støðið frá 2020 skal haldast** ..... 20
**II 4 Almannaverkið** ........ 22
**II 4.1 Útreiðslutrýstið í Almannaverkinum** ........ 24
**II 5 Barnamenning** ........ 25
**II 5.1 Núverandi tørvur á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu** ........ 30
**II 6 Fólkaskúlaøkið** ........ 38
**II 7 Útbúgvingar føroyingar nema sær á vælferðarøkinum** ........ 44
**II 8 Keldur** ........ 46

## II 1 Inngangur: Eitt øðrvísi framhald av haldførisframrokningunum

Á vári 2015 gav Búskaparráðið út eina frágreiðing við greiningum av **búskaparpolitska haldføri** almenna geirans í Føroyum. Niðurstøðan og útlitið út frá hesum greiningum í 2015 var, at búskaparpolitiska haldførið[1] er ov vánaligt.

Spurningurin um búskaparpolitiskt haldføri snýr seg í stuttum um, hvørt inntøkur almenna geirans í framtíðini fara at svara til útreiðslur almenna geirans í framtíðini - treytað av, at tann í útgangsárinum (basisárinum) rikni búskaparpolitikkurin heldur fram óbroyttur.

Úrslitið av hesum útrokningum í 2015 var, at inntøkurnar hjá almenna geiranum við verandi búskaparpolitisku kós verri enn so fóru at mótsvara útreiðslunum hjá almenna geiranum**.** Tann stóri mismunurin stavar í høvuðsheitum frá stóru demografisku broytingunum, sum vit í næstu framtíð fara at standa yvir fyri.

Hetta umrødda haldførið varð í 2015 útroknað og mált kvantitativt við einum "haldførisindikatori". Hesin indikatorur gevur, sum prosenttal av BTÚ, ta upphæddarligu tillagingina, sum skal til fyri at røkka einum nøktandi haldføri.

Búskaparpolitiski haldførisindikatorurin var í 2015 roknaður út at vera -5. Hetta rokniúrslit ber boð um tørvin á eini varandi herðing av búskaparpolitikkinum (í mun til útgangsárið) - eini varandi herðing við eini peningaupphædd svarandi til 5% av BTÚ árliga.

---

Tann í viðstøddu útrokning gjørda greining og framrokning av tørvinum á útbúnum starvsfólkum á vælferðarøkinum kann roknast sum framhald av teimum greiningum og framrokningum av búskaparpolitiska haldførinum, sum Búskaparráðið fór undir í 2015.

Mannagongdirnar í hesum nýggju greiningum eru kortini heilt øðrvísi enn mannagongdirnar við kvantitativu haldførisgreiningunum í 2015.

Mótsett fíggjarligum haldførisútrokningum við "indikatorum" mega framrokningarnar av starvsfólkatørvi og útbúgvingartørvi snúgva seg um m.a. demografiskar støddir. Hetta snýr seg sostatt um eitt øðrvísi sjónarhorn til tess at skoða haldførið.

Útrokningarnar byggja sjálvsagt á nakrar fortreytir um demografigongd og konjunkturar. Vegna fortreytirnar eru úrslitini av hesum útrokningum tískil knýtt at nøkrum óvissum. Hesar óvissur kunnu tó ikki fella niðurstøðuna um eitt ov vánaligt haldføri í 2015.

Grundað á demografisku útlitini kunnu vit næstu 10 árini rokna við, at:

Aldursbólkurin við fólki yvir 80 ár fer at vaksa við umleið 1.200 fólkum ella 52% komandi 10 árini. Tørvurin í **eldrarøkt** verður 706 fulltíðar starvsfólk aftur at verandi starvsfólkahópi, umframt 338 nýggj búpláss næstu 10 árini, um verandi vælferðarstøði frá 2020 skal haldast í 2030. Harumframt fara 358 fulltíðar starvsfólk á pensjón næstu 10 árini á eldraøkinum.

Í **sjúkrahúsverkinum** starvast 394 sjúkrarøktarfrøðingar (fulltíðar starvsfólk). Framrokningar eru gjørdar í norðurlendskum høpi, ið vísa, at tørvur verður á 30% fleiri ársverkum vegna demografisku gongdina. Hetta merkir, at tørvur verður á 118 sjúkrarøktarfrøðingum afturat í árunum fram til 2030. Óvissur eru altíð í framskrivingum, men demografisku útlitini benda týðiliga á, at útreiðslutrýstið fer at vaksa, um verandi vælferðarstøði skal haldast. Vøksturin av fólki yvir 80 ár komandi 10 árini fer at krevja kostnaðarmiklar uppnormeringar í sjúkrahúsverkinum og í læknaviðtalum vegna økt krøv til viðgerðir og tænastur, umframt økt útreiðslutrýst vegna brúk av nýggjari og dýrari heilivági.

[1] "búskaparpolitiskt haldføri" og "fíggjarpolitiskt haldføri" verða her nýtt hvørt um annað við sama týdningi

# Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini

Sambært útrokning hjá **almannaverkinum** er tørvur á 500 fulltíðar starvsfólkum afturat verandi starvsfólkahópi komandi 10 árini vegna demografiskar broytingar og nýtt virksemi. Harafturat væntast 200 - 300 fulltíðar starvsfólk at fara frá fyri aldur komandi 10 árini.

Hóast talið á eldri fólki er vaksandi, hevur talið á børnum støðuga gongd. Tískil væntast einki stórvegis hægri trýst á barnamenningarøkið vegna tal á børnum í framtíðini. Hóast barnatalið ikki væntast at økjast komandi 10 árini, vísa útrokningar hjá Búskaparráðnum, at Tórshavnar kommuna hevur 89 fulltíðarstarvsfólk í eftirsleipi í løtuni fyri at røkka tí normering (tal av børnum pr. fulltíðarstarvsfólk), ið Tórshavnar kommuna metir seg hava í 2020. Harafturat er bert umleið 1/3 av starvsfólkunum á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu námsfrøðingar, hóast býtið sambært dagstovnalógini í minsta lagi eigur at vera 2/3 námsfrøðingar og í mesta lagi 1/3 hjálparfólk. Tórshavnar kommuna átti tískil at játtað meira til barnamenningarøkið.

**Fólkaskúlin** er ikki mettur at hava avbjóðingar viðvíkjandi tørvi á starvsfólki komandi árini, eftirsum framrokningar í barnatalinum í aldrinum 7-16 ár hevur støðuga gongd. Í 2020 vóru 117 lærarar millum 60 og 70 ár, men tilgongdin av nýútbúnum lærarum hevur verið umleið 28 í miðal árliga síðani 2008 í Føroyum. Nýútbúnir lærarar av Fróðskaparsetri Føroya fara tí meir enn at fylla tørvin, ið uppstendur, tá ið eldru lærarar fara frá fyri aldur.

Verður hugt at teimum, ið **útbúgva** seg á vælferðarøkinum í Føroyum, sæst millum annað, at hesi nám hava eina yvirvág av kvinnum. Tað er eitt gjøgnumgangandi mynstur, at fáir menn útbúgva seg á vælferðarøkinum.

Niðurstøðurnar omanfyri vísa, hvussu týdningarmikið tað er, ikki *bert* at taka til eftirtektar útrokningina av haldførinum sum einans "indikator", men *eisini* at geva haldførinum ans, soleiðis sum haldførisavbjóðingarnar koma til sjóndar í staðfesta og roknaða talinum av tvørrandi starvsfólkum og tvørrandi starvsfólkafígging á teimum størru útreiðsluøkjunum.

Tvørrandi talið av útbúnum starvsfólkum er – sum nú er – ein hóttan móti dygdini á veitingunum á bæði barnamenningar- og eldrarøktarøkinum. Átakið við at lyfta støðið og dygdina í veitingunum verður tí samsvarandi tyngri.

Tað er serliga á eldra-, heilsu- og barnamenningarøkinum, at avbjóðingarnar eru.

Konjunkturfrágreiðingar Búskaparráðsins hava í seinastuni verið bjartskygdar um gongdina. Sum mótvekt móti hesum einsíðuga bjartskygni hevur Búskaparráðið í hvørji frágreiðing síðan 2015 nevnt haldførisavbjóðingina, tó uttan at fáa nevniverdan respons frá politisku skipanini.

Niðurstøðurnar omanfyri vísa, at vit næstu 10 árini fara at standa fyri einum samansettum trupulleikamáli, ið politiska skipanin ikki hevur givið stórvegis gætur enn og heldur ikki hevur raðfest.

Næstu tættirnir í hesi frágreiðing eru um: (2) Eldraøkið, (3) sjúkrahúsverkið, (4) almannaverkið, (5) barnamenningarøkið, (6) fólkaskúlan og (7) útbúgvingar, ið føroyingar nema sær.

Búskaparráðið hevur hesi tilmæli:

- At farið verður í gongd alt fyri eitt at útbúgva fleiri fólk fyri at tryggja størri arbeiðsmegi
- At fíggingargrundarlagið verður endurskoðað og fleiri inntøkur fingnar til vega
- At neyv mál verða ásett fyri, hvørjar framtíðar vælferðartænastur skulu veitast til hvørjar borgarar
- At seta sum mál at fáa fleiri at arbeiða fulla tíð á vælferðarøkinum
- At skapa karmar fyri at fáa skikkaða útlendska arbeiðsmegi til landið og skapa grundarlag fyri, at tey gerast ein fult virkandi partur av samfelagnum

# II 2 Eldraøkið

Hesin tættur snýr seg um starvsfólk og viðskiftar á eldraøkinum.

Útrokningar hjá búskaparráðnum vísa, at skal støðið frá 2020 haldast í 2030, er neyðugt við 706 fulltíðar starvsfólkum afturat innan eldrarøktina, og 338 nýggj búpláss. Harumframt fara 358 fulltíðar starvsfólk á pensjón næstu 10 árini innan eldraøkið.

Sum sæst av talvu II 1 og mynd II 1 starvast í alt 1351 starvfólk á eldraøkinum kring alt landi. Manningin á eldraøkinum samansett av heilsuhjálparum (57% ella 770), heilsurøktarum (22% ella 293) og sjúkrarøktarfrøðingum (21% ella 284).

Tað sæst eisini, at av teimum 1351 fólkum, sum í oktober mánað 2020 arbeiddu á eldraøkinum, arbeiddu 36% (475) í Havn.

**Sáttmálar og starvsfólk á eldraøkinum 31. oktober 2020** **Talva II 1**

| | Uttan fyri Havnina | Í Havnini | Alt landið |
|---|---|---|---|
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 168 | 116 | 284 |
| Føroya Pedagogfelag | 3 | 1 | 4 |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 506 | 264 | 770 |
| Heilsurøktarafelagið, KAF | 199 | 94 | 293 |
| **Tilsamans** | **876** | **475** | **1351** |

**Kelda:** Gjaldstovan og Tórshavnar komm.

**Sáttmálar og starvsfólk á eldraøkinum 31. oktober 2020** **Mynd II 1**




**Kelda:** Gjaldstovan og Tórshavnar komm.

Talva II 2 og mynd II 2 vísa **aldursbýtið** á teimum 1351 starvsfólkunum, ið arbeiða á eldraøkinum. Víst er aldursbýtið hjá starvsfólkunum uttan fyri Havnina, í Havn og fyri alt landið.

Talva II 2 vísir eisini, at fyri alt landið vóru í oktober mánaði 2020 358 starvsfólk yvir 60 ár.

Fyri Havnina var støðan í so máta ikki so álvarsom sum fyri økini uttan fyri Havnina. Eldrarøktin uttan fyri Havnina hevði í oktober mánaði 2020 255 starvsfólk yvir 60 ár. Eldrarøktin í Havn hevði um sama mundið 103 starvsfólk yvir 60 ár.

Um 10 ár – í 2030 – verða øll hesi umrøddu starvsfólk yvir 70 ár. Verður pensjónsaldurin hjá hesum fólkum 70 ár, fara vit í 2030 at hava mist hesi 358 starvsfólkini úr arbeiðsmegini.

# Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini

Nógv óvæntað kann sjálvsagt henda eftir 10 árum. Eitt skifti í konjunkturunum kann til dømis broyta nógv. Hinvegin – sum støðan er nú – hevur eldrarøktin stórar trupulleikar við at fáa útvegað tey neyðugu starvsfólkini, og serstakliga er trupult at finna faklærd starvsfólk.

Nakrir aðrir sambundnir og helst sínámillum sjálvforsterkandi eginleikar gera seg galdandi, tá ið tað snýr seg um manningina á eldrarøktarøkinum:

(1) Felags fyri manningina á eldraøkinum er ein **lágur miðal starvsbrøkur.** Ein starvsbrøkur er brøkparturin av einum fulltíðarstarvi. Vanligast nýttir starvsbrøkar eru 0,7 ella 0,8. Nærum helvtin (46%) av starvsfólkunum á eldraøkinum í Havn hava starvsbrøk, og meira enn triðingurin (36%) av starvsfólkunum uttan fyri høvuðsstaðarøkið hevur starvsbrøk.[2] Vegna stóru nýtsluna av starvsbrøkum er talið av ársverkum nógv minni enn talið av starvsfólkum. Vaktarskipanin á eldraøkinum fellur væl saman við brúk av starvsbrøki. Nógv starvsfólk, ið arbeiða við starvsbrøki, ynskja sær fulltíðararbeiði, men hetta er í flestøllum førum ikki gjørligt.[3]

(2) Ein annar felags eginleiki við manningini á eldraøkinum er stóra nýtslan av leysari starvssetan við **tímaløn**, og ikki fastari starvssetan við mánaðarløn. Av teimum 1351 starvsfólkunum vóru í miðal 60% mánaðarlønt – lutfalsliga nakað minni í Havn (54%) enn uttan fyri Havnina (64%). Stóra nýtslan av tímaløn fer fram í samsvari við starvsfólkaynski. Eitt tímalønt starvsfólk við leysari starvssetan hevur størri frælsi til at siga nei til at taka eina umbidna vakt, men eitt mánaðarlønt starvsfólk við fastari starvssetan hevur ikki sama frælsið. Henda støðan er ikki gagnlig fyri arbeiðsplássið; hon lítilsger arbeiðsskyldurnar.[4]

(3) Starvsøkið er í alstóran mun eitt **starvsøki fyri kvinnur**, sum eisini – í tvørrandi javnstøðu – skulu kunna taka sær av sínum egna húsarhaldi. Starvsbrøkur og tímaløn passa her væl inn.

(4) Ein annar kritiskur eginleiki er stóra talið av **ófaklærdum starvsfólkum**. At ófaklærd royna at læra hvørt annað upp er ósunt, um tað so viðhvørt er neyðugt. Ónollur kunnu tá lættliga gerast tillærdar, og bæði óvanar og vanar kunnu vera ringir at sleppa av aftur við. Av hesi orsøk eiga bert tey bestu í einum yrki at sleppa at undirvísa nýbyrjarum í sínum yrkisførleikum. Tað er hetta, ið roynt verður á Heilsuskúlanum í Suðuroy.

(5) Ein annar felags eginleiki við eldraøkinum er **lítla nýtslan av mannfólkinum** sum arbeiðsmegi. Av teimum 1351 starvsfólkunum í eldrarøktini eru bert 25 mannfólk[5].

Neyðugt verður í komandi árum at gagnnýta betur tann verandi starvsfólkahópin á eldraøkinum og at fáa vaksið um atdráttarmegina hjá eldraøkinum sum arbeiðspláss.

Ein máti at gera hetta er at fáa størri part av starvsfólkahópinum at arbeiða fulla tíð og mánaðarlønt uttan starvsbrøk, og at fáa fleiri mannfólk inn í starvsfólkahópin. Gerast má upp við hesar omanfyri nevndu eginleikarnir á eldraøkinum, sum í felag gera eldraøkið til eitt lítið eftirsóknarvert og eitt láglønt kvinnuyrki. Hugburðurin um, at eitt kvinnuyrki (eitt nú eldrarøkt og barnaansing) eigur at vera eitt láglønaryrki, sýnist framvegis ikki at vera sleptur heilt.

[2] Kelda: Gjaldstovan og Tórshavnar kommuna
[3] Upplýsing frá Tórshavnar kommunu
[4] Gjaldstovan og Tórshavnar kommuna
[5] Ibid.

# Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini

**Aldursbýtið á starvsfólkunum á eldraøkinum 31.10 2020** — **Talva II 2**

| Ár | Uttan fyri Havnina | Í Havnini | Alt landið |
|---|---|---|---|
| 10 - 19 | 12 | 6 | 18 |
| 20 - 29 | 111 | 104 | 215 |
| 30 - 39 | 121 | 68 | 189 |
| 40 - 49 | 164 | 79 | 243 |
| 50 - 59 | 213 | 115 | 328 |
| 60 - 69 | 224 | 82 | 306 |
| 70 - 79 | 31 | 20 | 51 |
| 80 - 89 | | 1 | 1 |
| **Tilsamans** | **876** | **475** | **1351** |

**Kelda:** Gjaldstovan og Tórshavnar komm.

**Aldursbýtið á starvsfólkunum á eldraøkinum** — **Mynd II 2**




**Kelda:** Gjaldstovan og Tórshavnar komm.

**Miðalaldur hjá starvsfólkum í eldrarøkt í Havnini** — **Talva II 3**

| | Miðalaldur | Tal |
|---|---|---|
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 44 | 116 |
| Føroya Pedagogfelag | 59 | 1 |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 47 | 264 |
| Heilsurøktarafelagið, KAF | 43 | 94 |
| **Íalt** | 45 | 475 |

**Kelda:** Gjaldstovan og Tórshavnar komm.

**Miðalaldur hjá starvsfólkum í eldrarøkt uttanfyri Havnina** — **Talva II 4**

| | Miðalaldur | Tal |
|---|---|---|
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 46 | 168 |
| Føroya Pedagogfelag | 60 | 3 |
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 48 | 506 |
| Heilsurøktarafelagið, KAF | 52 | 199 |
| **Íalt** | 49 | 876 |

**Kelda:** Gjaldstovan og Tórshavnar komm.

Talva II 3 og II 4 vísa miðalaldur hjá starvsfólkum, ávikavist í Havn og uttan fyri Havnina. Aldursmunurin millum heilsurøktarar uttan fyri Havnina og í Havn er ikki lýstur.

Vegna skeiva aldursbýtið á starvsfólkunum í eldrarøktini uttanfyri Tórshavn, og vegna lítlu atdráttarmegina hjá eldrarøktini sum heild sum arbeiðspláss, fær politiska og umsitingarliga leiðslan á eldraøkinum nakrar avbjóðingar í komandi árum.

Fyri at avbjóðingarnar ikki skulu vaksa seg uppaftur størri, eiga tillagingar at verða gjørdar í góðari tíð. Ansurin eigur í hesum sambandi at verða vendur ímóti teimum eginleikum við manningini á eldraøkinum, ið umrødd hava verið frammanfyri, herundir kynsbýtið og nýtslan av tímaløn og brøki og av ófaklærdari arbeiðsmegi.

Í starvsviðurskiftum hevur lønin ikki bert týdning sum eitt keypsamboð hjá løntakara. Lønin virkar eisini sum ein ímynd um, hvussu eftirsóknarverdur ein arbeiðsinnsatsur er mettur og settur at verða. Nógv bendir á, at eldraøkið í hesum høpi liggur á lágmarkinum – har tað enntá er næstan ómøguligt at fáa fulltíðararbeiði.

Eitt lønarlyft eigur eisini at verða umhugsað fyri manningina á eldraøkinum, men einans fyri útbúnu arbeiðsmegina. At veita eina betri hóskandi løn til úrvald starvsfólk undir teirra útbúgving sum heilsuhjálparar eigur eisini at verða umhugsað.

| **Yvirlit yvir røktarheimsbúpláss** | | | **Talva II 5** |
|---|---|---|---|
| | 01.jan.2015 | 01.jan.2020 | Vøkstur |
| **Heimatænastan í Vágum** | **37** | **37** | **0** |
| Heimið á Sýnini | 37 | 37 | 0 |
| **VEKS** | **71** | **71** | **0** |
| Heimið á Grønanesi í Vestmanna | 24 | 24 | 0 |
| Røktarheimið á Mørkini í Streymnesi | 32 | 32 | 0 |
| Korndalsbýlið á Eiði | 15 | 15 | 0 |
| **Nánd** | **40** | **41** | **1** |
| Eldrasambýlið Giljagarður í Leirvík | 10 | 10 | 0 |
| Eldrasambýlið Gøtubrá í Norðagøtu | 16 | 18 | 2 |
| Eldrasambýlið Vesturstova í Fuglafirði | 14 | 13 | -1 |
| **Roðin** | **101** | **96** | **-5** |
| Eysturoyar Røktar- og ellisheim í Runavík | 70 | 70 | 0 |
| Heimið á Mýrunum | 8 | - | -8 |
| Vesturskin á Toftum | 16 | 16 | 0 |
| Sjóvarlon á Strondum | - | 10 | 10 |
| Sambýlið á Skála | 7 | - | -7 |
| **Norðoya Bú- og Heimatænasta** | **87** | **84** | **-3** |
| Heimið við Vágna í Klaksvík | 24 | 24 | 0 |
| Norðoya Røktarheim | 28 | 28 | 0 |
| Norðoya Ellis- og Vistarheim | 11 | 10 | -1 |
| Sambýlið í Bøgøtu í Klaksvík | 8 | 7 | -1 |
| Sambýlið á Heygnum í Klaksvík | 16 | 15 | -1 |
| **Økistænastan í Sandoyar sýslu** | **23** | **26** | **3** |
| Áargarður á Sandi | 10 | 11 | 1 |
| Eldrasambýlið Skerið í Skopun | 6 | 7 | 1 |
| Eldrasambýli Gerðisgarður | 7 | 8 | 1 |
| **Bú- og Heimatænastan í Suðuroy** | **69** | **69** | **0** |
| Suðuroyar Ellis- og Røktarheim á Tvøroyri | 24 | 24 | 0 |
| Hamragarður í Vági | 24 | 24 | 0 |
| Eldrasambýlið í Vági | 12 | 12 | 0 |
| Eldrasambýlið í Hvalba | 9 | 9 | 0 |
| **Heilsu- og umsorganartænastan - Tórsl** | **218** | **221** | **3** |
| Boðanesheimið | 64 | 64 | 0 |
| Ellis- og umlættingarheimið | 33 | 33 | 0 |
| Røktarheimið Lágargarður | 48 | 48 | 0 |
| Røktarheimið Tjarnargarður | 34 | 34 | 0 |
| Heimið við Vallalíð | 16 | 16 | 0 |
| Eldrasambýlið oman Hoydalar | 8 | 10 | 2 |
| Eldrasambýlið oman Mattalág | 8 | 9 | 1 |
| Eldrasambýlið í Kollafirði | 7 | 7 | 0 |
| **Tilsamans** | **646** | **645** | **-1** |

**Kelda:** Almannaráðið

## II 2.1 Neyvari lýsing av heilsuhjálparum á eldraøkinum

Talva II 10 gevur neyvari lýsing av heilsuhjálparum uttan fyri Havnina, herundir teirra plasering á lønarstiganum.

Talva II 11 gevur eina tilsvarandi lýsing av heilsuhjálparum í Havn.

| **Býti í lønarstig í Heilsuhjálparafelag Føroya, uttanfyri Havnina** | | **Talva II 6** |
|---|---|---|
| Lønarstig | Starvsheiti | Limatal |
| 2 | Heimahjálpari | 154 |
| 3 | Heimahjálpari | 16 |
| 4 | Heimahjálpari | 12 |
| 5 | Heimahjálpari | 9 |
| 6 | Heimahjálpari | 5 |
| 7 | Heilsuhjálpari | 41 |
| 7b | Heimahjálpari | 39 |
| 8 | Heilsuhjálpari | 27 |
| 9 | Heilsuhjálpari | 31 |
| 10 | Heilsuhjálpari | 26 |
| 11 | Heilsuhjálpari | 58 |
| 12 | Heilsuhjálpari | 88 |
| **Tilsamans** | | **506** |
| Ófaklærd | Heimahjálparar (stig 2-6 og 7b) | 235 |
| Faklærd | Heilsuhjálparar (stig 7-12) | 271 |
| **Íalt** | | **506** |

**Kelda:** Føroya Gjaldstova

Tað sæst[6] av talvu II 10, at 235 av teimum 506 limunum í heilsuhjálparafelagnum uttan fyri Havnina eru ófaklærdir heimahjálparar (46% av limunum). Restin av teimum 506 limunum eru faklærdir.

Tað sæst somuleiðis av talvu II 11, at 186 av teimum 264 limunum í heilsuhjálparafelagnum í Havn eru ófaklærdir heimahjálparar (70% av limunum).

| **Býti í lønarstig í Heilsuhjálparafelag Føroya, í Havnini** | | **Talva II 7** |
|---|---|---|
| Lønarstig | Starvsheiti | Limatal |
| 2 | Heimahjálpari | 108 |
| 3 | Heimahjálpari | 19 |
| 4 | Heimahjálpari | 8 |
| 5 | Heimahjálpari | 1 |
| 6 | Heimahjálpari | 11 |
| 7 | Heilsuhjálpari | 11 |
| 7b | Heimahjálpari | 39 |
| 8 | Heilsuhjálpari | 9 |
| 9 | Heilsuhjálpari | 7 |
| 10 | Heilsuhjálpari | 12 |
| 11 | Heilsuhjálpari | 14 |
| 12 | Heilsuhjálpari | 25 |
| **Tilsamans** | | **264** |
| Ófaklærd | Heimahjálparar (stig 2-6 og 7b) | 186 |
| Faklærd | Heilsuhjálparar (stig 7-12) | 78 |
| **íalt** | | **264** |

**Kelda:** Tórshavnar kommuna

[6] Týdningurin av lønarstiganum

Tórshavnar kommuna upplýsir, at hesi 264 starvsfólkini í Havn geva 177 ársverk. Tey 506 starvsfólkini uttan fyri Havnina skuldu so sambært einfaldari beinleiðis útrokning givið 339 ársverk.

Heilsuskúlin í Suðuroy upplýsir fyri Búskaparráðnum, at frá 2008 til 2019 hava 370 heilsuhjálparar tikið prógv. Hetta gevur í miðal 31 um árið.

Sum víst í talvu II 1 arbeiða 770 heilsuhjálparar á landsins ellis- og røktarheimum, og brúk kann skjótt gerast fyri fleiri. Tølini benda , at kapasiteturin á Heilsuskúlanum í Suðuroy er ikki ov stórur, og at skúlin eigur at geva møguligum fráfalli størri ans.

## II 2.2 Neyvari lýsing av heilsurøktarum á eldraøkinum

Heilsurøktarfelagið hýsir starvsfólkum við teirri nýggju útbúgvingini sum heilsurøktari (heilsurøktari svarar umleið til danska heitið sosu-assistent). Útbúgvingin sum heilsurøktari skal koma í staðin fyri gomlu útbúgvingarnar sum pleygari, sjúkrahjálpari, ítrivsvegleiðari, røktarheimsassistentur, v.m., ið kunnu uppstigast. Umframt "nýggjum" heilsurøktarum hýsir felagið eisini fólkum við hesum omanfyri nevndu "gomlu" útbúgvingunum.

Talva II 8 gevur neyvari lýsingina av limunum í heilsurøktarafelagnum uttan fyri Havnina – hesir eru einans 199 í tali.

Talva II 9 gevur samsvarandi lýsing av heilsurøktarum í Havnini. Teir eru einans 94 í tali.

Arbeiðsøkini hjá heilsurøktarum sýnast at liggja ímillum arbeiðsøkini hjá sjúkrarøktarfrøðingum og arbeiðsøkini hjá heilsuhjálparum. Nógvir limir arbeiða á kommunalum døgnstovnum (eldrarøkt) og í almannaverkinum, men lutfalsliga fáir arbeiða á sjúkrahúsunum.

**Heilsurøktarafelagið, KAF, uttanfyri Havnina** **Talva II 8**

| Lønarstig | Starvsheiti | Limatal |
|---|---|---|
| 18 | Heilsurøktari | 14 |
| | Sjúkrahjálpari | 1 |
| 19 | Heilsurøktari | 19 |
| 20 | Heilsurøktari | 21 |
| 21 | Heilsurøktari | 23 |
| | Sjúkrahjálpari | 1 |
| 22 | Heilsurøktari | 14 |
| | Ítrivsvegleiðari | 1 |
| | Sjúkrahjálpari | 22 |
| 23 | Heilsurøktari | 15 |
| 24 | Almanna- og heilsurøktari | 1 |
| | Heilsurøktari | 63 |
| 36 | Deildarleiðari | 2 |
| 38 | Deildarleiðari | 2 |
| **Tilsamans** | | **199** |

**Kelda:** Føroya Gjaldstova

| **Heilsurøktarafelagið, KAF, Í Havnini** | | **Talva II 9** |
|---|---|---|
| Lønarstig | Starvsheiti | Limatal |
| 18 | Heilsurøktari | 7 |
| | Heilsurøktari á Ellisheimi u/búna | 14 |
| | Sjúkrahjálpari | 1 |
| 19 | Heilsurøktari | 6 |
| | Heilsurøktari á Ellisheimi u/búna | 3 |
| 20 | Heilsurøktari | 4 |
| | Heilsurøktari á Ellisheimi u/búna | 3 |
| 21 | Heilsurøktari | 2 |
| 22 | Heilsurøktari | 4 |
| | Heilsurøktari á Ellisheimi u/búna | 2 |
| | Heilsurøktari á Ellisheimi v/búna | 1 |
| | Mánaðarlønt | 1 |
| | Sjúkrahjálpari | 5 |
| | Sjúkrahjálpari á Ellisheimi u/búna | 3 |
| | Sjúkrahjálpari á Ellisheimi v/búna | 3 |
| 23 | Heilsurøktari | 2 |
| 24 | Almanna- og heilsuatstøðari | 1 |
| | Heilsurøktari | 17 |
| | Heilsurøktari á Ellisheimi u/búna | 10 |
| | Heilsurøktari á Ellisheimi v/búna | 4 |
| | røktarstarvsfólk | 1 |
| **Tilsamans** | | **94** |

**Kelda:** Føroya Gjaldstova

Frá 2008 til 2019 hava 215 heilsurøktarar tikið prógv á Heilsuskúlanum í Suðuroy. Hetta gevur í miðal 18 um árið. Hesir 215 kunnu sammetast við teir 293 (199+94), sum arbeiddu í eldrarøktini í oktober 2020, sí talvu II 8 og II 9. Fleiri upplýsingar eru neyðugar til tess at gera neyvari meting og niðurstøðu.

## II 2.3 Neyvari lýsing av sjúkrarøktarfrøðingum á eldraøkinum

**Sjúkrarøktarfrøðingar Uttanfyri Havnina** **Talva II 10**

| Lønarstig | Starvsheiti | Limatal |
|---|---|---|
| 1 | Sjúkrarøktarfrøðilesandi | 20 |
| | Sjúkrarøktarfrøðingur | 14 |
| 2 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 12 |
| 3 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 12 |
| 4 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 29 |
| 5 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 37 |
| 6 | Bólkaleiðari | 3 |
| | Sjúkrarøktarfrøðingur | 1 |
| | Visitator | 4 |
| 8 | Varaleiðari | 3 |
| 9 | Deildarleiðari | 26 |
| 10 | Eindarleiðari | 3 |
| | Varaleiðari | 2 |
| 11 | Eindarleiðari | 1 |
| | Stjóri | 1 |
| **Tilsamans** | | **168** |

**Kelda:** Føroya Gjaldstova

**Sjúkrarøktarfrøðingar í Havnini** **Talva II 11**

| Lønarstig | Starvsheiti | Limatal |
|---|---|---|
| 1 | Røktarstarvsfólk | 1 |
| | Sjúkrarøkarfrøðingur | 1 |
| | Sjúkrarøktarfrøðilesandi | 12 |
| | Sjúkrarøktarfrøðingur | 11 |
| 2 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 16 |
| 3 | røktarstarvsfólk | 1 |
| | Sjúkrarøktarfrøðingur | 11 |
| 4 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 18 |
| | Sjúkrarøktarfrøðingur | 1 |
| 5 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 22 |
| | Skipanarfólk | 1 |
| 6 | Sjúkrarøktarfrøðingur | 1 |
| | Visitator | 3 |
| 9 | Deildarleiðari | 2 |
| | Leiðari 3 deildarleiðari | 1 |
| | Leiðari 3, Deildarleiðari | 11 |
| 11 | Eindarleiðari í Heilsu- og umsorgana | 1 |
| | Eindarleiðari í Heilsu-og umsorganar | 1 |
| | Eindarleiðari, sjúkrarøktarfrøðingur | 1 |
| **Tilsamans** | | **116** |

**Kelda:** Føroya Gjaldstova

Frá 2008 til 2019 hava 203 sjúkrarøktarfrøðingar tikið prógv í Føroyum. Hetta gevur í miðal 17 um árið. Studni upplýsir, at skúlaárið 2019/20 lósu 51 føroyingar sjúkrarøktarfrøði uttanlands.

Umleið 400 sjúkrarøktarfrøðingar arbeiða í sjúkrahúsverkinum[7], og í eldrarøktini arbeiða 284 (168+116). Taka vit við sjúkrarøktarfrøðingar í læknaviðtalum og almannaverkinum, skuldu tað sostatt arbeitt umleið

[7] Ríkisumboðið 2020 frágreiðing s. 247

750 sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum. Tað er eyðsæð, at sjúkrarøktarfrøðingar serliga manna leiðarastørvini í eldrarøktini; í hesum høpi er sjúkrarøktarfrøðin at rokna sum ein leiðaraútbúgving.

Tað hevur verið siðvenja hjá nýútbúnum sjúkrarøktarfrøðingum at ferðast og arbeiða í útlondum eitt tíðarskeið eftir lokna útbúgving – útbúgvingin kann jú nýtast allastaðni. Myndugleikin kundi í staðin gjørt tað áhugaverdari hjá sjúkrarøktarfrøðingum at skift ímillum størv í Føroyum.

## II 2.4 Onnur viðurskifti á eldraøkinum

Vit kunnu taka nakað samanum viðvíkjandi útbúgving og starvsfólkatali í eldrarøktina uttan fyri Havnina[8].

| **Útbúgvingarstig hjá starvsfólki í eldrarøktini uttanfyri Tórshavn** | | **Talva II 12** |
|---|---|---|
| | Tils. | Pct býtið |
| Ófaklærdir heimahjálparar | 235 | 27% |
| Faklærdir heilsuhjálparar (0-15 mánaða útb.) | 271 | 31% |
| Faklærdir sjúkrarøktarfrøðingar (4 ára útbúgving) | 168 | 19% |
| Pædagogar | 3 | 0% |
| Faklærdir heilsurøktarar (37 mánaða útb.) | 199 | 23% |
| **Íalt uttanfyri Tórshavn** | **876** | **100%** |

**Kelda:** Gjaldstovan

Vit síggja her, at 58% (27%+31%) hava minstu útbúgving, og at sjúkrarøktarfrøðingar hava longstu útbúgving. Ímillum hesi liggja heilsurøktararnir.

Heilsurøktararnir ligga útbúgvingarliga "ímillum" heilsuhjálparar og sjúkrarøktarfrøðingar (íroknað sjúkrarøktarfrøðingar við akademiskum BA-prógvi og MA-prógvi í sjúkrarøktarfrøði frá Fróðskaparsetrinum).

Sjúkarøktarfrøðingarnir rokna sína útbúgving sum leiðaraútbúgvingina og serútbúgvingina burturav á innan sjúkrarøkt.

----

Demografisku útlitini kenna vit, og eisini aldursbýtið hjá starvsfólkunum (smb. talvunum og grafunum frammanfyri).

Sum nevnt hava ellis- og røktarheimini tað torført við at fáa skikkaðar umsøkjarar við heilsufakligum útbúgvingum í heilsurøkt, heilsuhjálp og sjúkrarøktarfrøði (t.e. á røktarøkinum).

Hetta sama ger seg galdandi í sjúkrahúsverkinum og heilsuverkinum sum heild (t.e. á viðgerðarøkinum) – men í minni mun.

Við demografisku støðuni í starvsfólkahópinum og við demografisku støðuni í bólkinum av eldri fólkum verður roknað við, at støðan í so máta fer at versna.

Á eldraøkinum er hend stór útbygging seinastu árini. Kommunurnar hava nú eisini yvirtikið raksturin á hesum øki, sum tó í hesum førinum er skipað í eldrasamstørv, har fleiri kommunur eru saman. Hóast hetta økta samstarv er tað upp til hvørt eldraøki at taka sær av sínum egnu – eingin felags landsmyndugleiki hevur ta stýrandi og samskipandi uppgávuna. Sum eitt kuriosum kann nevnast, at Gjaldstovan tekur sær av starvfólkaumsitingini (lønargjaldingunum) á eldraøkinum fyri allar kommunur uttan Tórshavnar kommunu.

[8] Kelda: Gjaldstovan. Tórshavnar kommuna hevði ikki hesar upplýsingar

Kommunufelagið hevur tó ávísar yvirskipaðar og samskipandi-ráðgevandi uppgávur, bæði tá ið tað snýr seg um eldraøkið og dagstovnaøkið.

Niðanfyri er ein stutt lýsing og eitt sindur neyvari lýsing av starvsbólkahópinum eftir fakfelagstilknýti og útbúgvingum er hendan:

- Heilsuhjálparafelag Føroya hevur ólærdar limir (heimahjálparar) og eisini heilsuhjálparar við 0-15 mánaða útbúgving.
- Heilsurøktarafelagið hýsir teimum gomlu útbúgvingunum, ið funnust fram til 1991 (pleygari, sjúkrahjálpari, ítrivsvegleiðari, røktarheimsassistentur, sosu- assistentur), og hýsir eisini nýggju útbúgvingini sum heilsurøktarar (ið arbeiða við autorisatión eins og sjúkrarøktarfrøðingar). Útbúgvingin til heilsurøktara tekur 22 mánaðir, men hon byggir á 15 mánaða heilsuhjálparaútbúgving – við hesum tekur heilsurøktaraútbúgvingin 22+15=37 mánaðir frá grundini[9].
- Heilsuskúlin í Suðuroy er skúlin, har fólk verða útbúgvin sum heilsuhjálparar og heilsurøktarar. (Skúlin er studentaskúli og fer eisini at útbúgva námsfrøðihjálparar frá komandi skúlaári.) Umleið 30 árligir umsøkjarar hava verið til báðar útbúgvingarnar, men fráfallið kann vera stórt.
- Bachelorútbúgvingin í sjúkrarøktarfrøði á Fróðskaparsetur Føroyar hevur pláss fyri 30 lesandi. Uppstigan frá gomlu sjúkrarøktarafrøðisútbúgvingini til bachelor í sjúkrarøktarfrøði (individuelt) verður givin á Fróðskaparsetur Føroya. Bachelor útbúgvingin fevnir um eina ástøðiliga undirvísing á Setrinum samanlagt í 2½ ár og eina kliniska undirvísing samanlagt í 1½ ár á ymiskum deildum á sjúkrahúsum, ellis- og røktarheimum, viðgerðar- og fyribyrgingarstovnum, í heimatænastuni og á øðrum stovnum undir almannaverkinum kring landið, og í venjingarstovu á Setrinum.
- Fróðskaparsetur Føroya bjóðar eisini ein master í heilsuvísindum (2 ár fyri fulltíðarlesandi) – tvørfaklig tilgongd, 24 lesandi.
- Tað ber eisini til at taka PhD-prógv í sjúkrarøktarfrøði á Fróðskaparsetur Føroyar. Eitt slíkt prógv er prógv fyri granskingarførleika í sjúkrarøktarevnum á altjóða støði og í altjóða netverkum.

Bæði Fróðskaparsetur Føroya og heilsuskúlin í Suðuroy hava sum lærustovnar serøkið sjúkrarøkt. Okkum vantar ein lærustovn, ið umframt at taka sær av sjúkraviðgerð eisini kann útbúgva læknar. 84 føroyingar lósu til lækna í útlondum lestrarárið 2019/2020.

Tað er á hesum grundarlagi tískil einki undirvísingarligt samstarv millum Fróðskaparsetrið og Heilsuskúlan í Suðuroy. Hetta sjálvt um báðir lærustovnarnir hava sjúkrarøkt/heilsurøkt sum felags fokus – sjúkraviðgerðarspurningurin er jú læknaligur. Hvussu nógv tilfeingi skal tillutast viðgerðini og mótvegis røktini er bæði ein fakligur og ein politiskur spurningur.

## II 2.5 Framtíðar tørvur á eldraøkinum fram til 2030, um støðið frá 2020 skal haldast

Tað er starvsfólkahópurin og útbúgvingarstøði hansara komandi 10 árini, ið eru sett í fokus í hesum tátti.

Vit kunna brúka sum fyritreyt undir útrokningunum, at starvsfólkatalið er beinleiðis proportionalt við búfólkatalið, og at heilsugóð elding, nýggj tøkni, frá- og tilflyting, stór konjunkturvending, brúkið av starvsbrøki o.t. ikki ávirka nevnivert í 10 ára tíðarskeiðinum.

Búfólkini eru 645 í tali (sí talvu II 5), og starvsfólkatal er sum nevnt 1351. Roknistykkið er uppsett í tekstkassa 1.

[9] Samrøður við Heilsuskúlan í Suðuroy.

| **Tekstkassi 1: Framrokning fyri eldraøkið fyri yvir 80 ára gomul fram til 2030** | | |
|---|---|---|
| Roknistykkið fyri røktarheim og sambýli (tvs. eldraøkið) verður so hetta: | | |
| | | |
| Búfólkatal/tænastumóttakarar í 2020 | 645 | |
| Fólkatal í aldursbólki yvir 80 ár í 2020 | 2278 | Hagstovan |
| Brøkpartur av yvir 80 ára gl. tænastumóttakarum í 2020 | 0,283 | (645/2278) |
| Fólkatal í aldursbólki yvir 80 í 2030 | 3473 | Hagstovan |
| Búfólkatal um sami brøkpartur í 2030 sum í 2020 | 983 | (0,283*3473) |
| | | |
| Vøkstur í búfólkatali fyri at halda støðið | **338** | (983-645) |
| | | |
| Tal av starvsfólkum 2020 | 1351 | |
| Brøkparturin starvsfólk/tænastumóttakarar í 2020 | 2,09 | (1351/645) |
| Vøkstur í starvsfólkatali um sami brøkur í 2030 sum í 2020 | **706** | (2,09*338) |
| | | |
| Starvsfólkatal 2030 um sama støðið í 2030 sum í 2020 | **2057** | (1351+706) |

Útrokningarnar í tekstkassa 1 skulu á ongan hátt skiljast sum forsagnir. Talan er um roknidømi við fortreytum, sum ofta ikki kunnu verða uppfyltar. Hinvegin rokna vit við, at roknidømið gevur góðar ábendingar um møguligu gongdina í framtíðini.

Tekstkassi 1 vísir, at skal støðið frá 2020 haldast í 2030, er neyðugt við **338 nýggjum stovnsplássum** og við **706 starvsfólkum afturat**.

Upp í hesi 706 starvsfólkini er ikki íroknað nýsetanir av starvsfólkum, ið koma í staðin fyri starvsfólk, ið annars fram til 2030 fara frá. Hetta talið av nýsetanum kenna vit ikki.

Í rokniyvirlitinum omanfyri eru ikki øll viðurskifti tikin við. Skal 2020-støðið haldast, fer vøksturin í talinum av eldri fólki eisini at økja um almennu útreiðslurnar til pensjónir, sjúkrahúsverk og læknatænastur.

Mynd II 3 vísir úrslitið av eini framskriving av fólkatalinum yvir 80 frá 2000 til 2030[10].

[10] Kelda: Dátugrunnur Hagstovunnar

**Fólkatalsframskriving fyri 80 ár og eldri árini 2000-2030** **Mynd II 3**




**Kelda:** Hagstova Føroya

# II 3 Sjúkrahúsverkið

Hetta brotið snýr seg um starvsfólk og fíggjarútlit á sjúkrahúsverkinum.

Útrokningar hjá búskaparráðnum vísa, at 394 sjúkrarøktarfrøðingar (fulltíðar starvsfólk) starvast í sjúkrahúsverkinum. Framrokningar eru gjørdar í norðurlendskum høpi, ið vísa, at tørvur á 30% fleiri ársverkum. Hetta merkir, at tørvur verður á 118 sjúkrarøktarfrøðingum afturat í árunum fram til 2030.

Talva II 13 vísir talið á ársverkum[11] býtt á starvsfólkaheiti í føroyska sjúkrahúsverkinum fyri 2019.[12] Tað vóru í 2019 íalt 1060 ársverk í sjúkrahúsverkinum, og harav vóru 813 ársverk (77%) á Landssjúkrahúsinum.

**Ársverk á sjúkrahúsunum 2019** **Talva II 13**

| | Tórshavn | Klaksvík | Suðuroy | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Læknar | 93 | 10 | 9 | 112 |
| Sjúkrarøktarfrøðingar | 309 | 47 | 38 | 394 |
| Onnur røktarstarvsfólk | 73 | 7 | 21 | 101 |
| Onnur heilsufaklig starvsfólk | 100 | 32 | 21 | 153 |
| Umsitingarstarvsfólk | 143 | 14 | 12 | 169 |
| Onnur starvsfólk | 95 | 18 | 18 | 131 |
| **Ársverk í alt** | **813** | **128** | **119** | **1060** |

**Kelda:** Landssjúkrahúsið/leiðslukunningarskipanin

[11] Ársverk er her at skilja sum starvsfólkatímar umroknaðir til fult vikutímatal

[12] 2019 er víst, tí 2020 neyvan líkist einum normalári vegna koronu. Kelda: Landssjúkrahúsið/leiðslukunningarskipanin

Fyri Landssjúkrahúsið einsamalt hevur Búskaparráðið frá Landssjúkrahúsinum fingið upplýst nøkur hagtøl, sum her verða viðgjørd í talvum og myndum niðanfyri.[13]

Talva II 14 gevur eina útgreining av starvsfólkabólkunum á Landssjúkrahúsinum primo 2021, herundir teirra miðalaldur og miðal starvsbrøk. Stórir starvsbólkar eru sjúkrarøktarfrøðingar, læknar (79 læknar samanlagt) og limirnir í Starvsfelagi og Arbeiðskvinnufelagi. Starvsbólkar við munandi hægri aldri enn miðal eru limirnir í arbeiðarafeløgunum og limirnir í heilsurøktarafelagi og serlæknafelagi.

Miðal starvsbrøkurin fyri allar yrkisbólkarnar er 0,86.

**Landssjúkrahúsið: feløg og starvsfólkabólkar primo 2021** **Talva II 14**

| Feløg | Fólkatal | Miðalaldur | Miðalbrøkur |
|---|---|---|---|
| Akademikarafelag Føroya (AKF) | 29 | 44 | 0,86 |
| Bioanalytikarafelagið | 31 | 42 | 0,92 |
| Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya | 11 | 42 | 0,99 |
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 343 | 47 | 0,81 |
| Føroya Pedagogfelag | 1 | 52 | 0,85 |
| Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoter. | 24 | 40 | 0,83 |
| HAK - Havnar Arbeiðskvinnufelag, alm. | 51 | 56 | 0,79 |
| Havnar Arbeiðarafelag, privat | 1 | 62 | 1,00 |
| Heilsurøktarafelagið, Fíggjarmálaráðið | 26 | 56 | 0,78 |
| Heilsurøktarafelagið, KAF | 1 | 38 | 0,50 |
| Hjálparlæknaráð Føroya | 38 | 34 | 0,99 |
| Kommunulæknar | 1 | 38 | 1,00 |
| Kost- og Føðslufelagið | 17 | 50 | 0,96 |
| Ljósmøðrafelag Føroya | 29 | 42 | 0,78 |
| Maskinmeistarafelag Føroya | 5 | 50 | 1,00 |
| Serlæknafelag Føroya | 22 | 57 | 0,97 |
| Serlæknafelagið sáttmálasett | 18 | 47 | 1,01 |
| Starvsfelagið | 128 | 51 | 0,90 |
| Starvsfelagið. Sjúkraflutningsstarvsfólk | 29 | 49 | 1,00 |
| Tænastumannafelagið | 1 | 72 | 1,00 |
| Tænastumannalíknandi | 3 | 48 | 1,00 |
| **Íalt** | **809** | **48** | **0,86** |

**Kelda:** Landssjúkrahúsið

Mynd II 4 vísir aldursbýtið á øllum starvsfólkahópinum og vísir eisini eina sammeting við aldursbýtið hjá sjúkrarøktarfrøðingum, ið jú er størsti starvsbólkurin.

Í talvu II 15 sæst, at tað eru tilsamans 156 starvsfólk (138+18) millum 60 og 79 ár. Tey næstu 10 árini eru hesi 156 væntandi farin frá ella um at fara frá fyri aldur, og onnur skulu setast í staðin. Myndin bendir á, at siðvenjan á Landssjúkrahúsinum er ikki at arbeiða longur enn til vanligan pensjónsaldur.

[13] Búskaparráðið hevur vegna knappa tíð ikki gagnnýtt hagtøl Landssjúkrahúsins um seingjardagar býtt á aldur.

**Aldursbýtið á øllum starvsfólkahópinum sammett við aldursbýti sjúkrarøktarfrøðinga** **Mynd II 4**




**Kelda:** Landssjúkrahúsið

**Aldursbýtið á øllum starvsfólkahópinum sammett við aldursbýti sjúkrarøktarfrøðinga** **Talva II 15**

| | 20-29 | 30-39 | 40-49 | 50-59 | 60-69 | 70-79 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sjúkrarøktarfrøðingar á Landssjúkrahúsinum | 16 | 77 | 111 | 84 | 49 | 6 | 343 |
| **Tilsamans Starvsfólk á Landssjúkrahúsinum** | **47** | **185** | **215** | **204** | **138** | **18** | **807** |

**Kelda:** Landssjúkrahúsið

Mynd II 5 og talva II 16 vísir aldursbýtið á øllum starvsfólkahópinum og vísir eisini eina sammeting av aldursbýtinum hjá læknunum á Landssjúkrahúsinum. Myndin kundi bent á, at talið á læknum er ov lítið – serliga læknum í teimum ovaru aldursbólkunum. Nógva nýtslan av útlendskum læknakonsulentum vísir tað sama. Verður onki gjørt við hetta, kann tað enda við eini negativari ringrás.

**Parturin av starvsfólkahópinum í ymsum aldursbólkum á Landssjúkrahúsinum ið eru læknar** **Mynd II 5**




**Kelda:** Landssjúkrahúsið

**Parturin av starvsfólkahópinum í ymsum aldursbólkum á Landssjúkrahúsinum ið eru læknar** **Talva II 16**

| | 20-29 | 30-39 | 40-49 | 50-59 | 60-69 | 70-79 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Læknar á Landssjúkrahúsinum | 19 | 29 | 18 | 13 | 9 | 2 | 79 |
| **Tilsamans Starvsfólk á Landssjúkrahúsinum** | **47** | **185** | **215** | **204** | **138** | **18** | **807** |

**Kelda:** Landssjúkrahúsið

Talva II 17 vísir aldursbýtið á teimum einstøku yrkisbólkunum á Landssjúkrahúsinum saman við aldursbýtinum á øllum starvsfólkahópinum. Talvan vísir m.a., at 55 sjúkrarøktarfrøðingar eru 60 ár og eldri, og at 40 limir í Starvsfelagnum eru 60 ár og eldri.

**Landssjúkrahúsið: Aldursbýtið á øllum starvsfólkahópinum primo 2021** **Talva II 17**

| | 20-29 | 30-39 | 40-49 | 50-59 | 60-69 | 70-79 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Akademikarafelag Føroya (AKF) | | 10 | 12 | 5 | 2 | | 29 |
| Bioanalytikarafelagið | 2 | 12 | 10 | 5 | 2 | | 31 |
| Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya | 1 | 3 | 5 | 2 | | | 11 |
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 16 | 77 | 111 | 84 | 49 | 6 | 343 |
| Føroya Pedagogfelag | | | | 1 | | | 1 |
| Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoterapeut. | 1 | 12 | 6 | 4 | 1 | | 24 |
| HAK - Havnar Arbeiðskvinnufelag, alment | 1 | 5 | 5 | 18 | 19 | 2 | 50 |
| Havnar Arbeiðarafelag, privat | | | | | 1 | | 1 |
| Heilsurøktarafelagið, Fíggjarmálaráðið | | 1 | 4 | 11 | 9 | 1 | 26 |
| Heilsurøktarafelagið, KAF | | 1 | | | | | 1 |
| Hjálparlæknaráð Føroya | 8 | 25 | 4 | | | 1 | 38 |
| Kommunulæknar | | 1 | | | | | 1 |
| Kost- og Føðslufelagið | 2 | 3 | 4 | 6 | | 1 | 16 |
| Ljósmøðrafelag Føroya | 5 | 9 | 6 | 5 | 4 | | 29 |
| Maskinmeistarafelag Føroya | | | 2 | 3 | | | 5 |
| Serlæknafelag Føroya | | | 2 | 12 | 7 | 1 | 22 |
| Serlæknafelagið sáttmálasett | | 3 | 12 | 1 | 2 | | 18 |
| Starvsfelagið | 10 | 14 | 27 | 37 | 35 | 5 | 128 |
| Starvsfelagið. Sjúkraflutningsstarvsfólk | 1 | 8 | 5 | 8 | 7 | | 29 |
| Tænastumannafelagið | | | | | | 1 | 1 |
| Tænastumannalíknandi | | 1 | | 2 | | | 3 |
| **Íalt** | **47** | **185** | **215** | **204** | **138** | **18** | **807** |

**Kelda:** Landssjúkrahúsið

Talva II 18 vísir, at kynsbýtið á Landssjúkrahúsinum er nógv avskeplað – 84% av øllum starvsfólkahópinum eru kvinnur, og ikki minni enn 99% av sjúkrarøktarfrøðingunum eru kvinnur. Stór kvinnuyvirvág er millum bioanalytikarar, akademikarar, hjá Starvsfelagnum, ljósmøðrum og fysioterapeutum.

**Kynsbýtið í einstøku starvsbólkunum primo 2021** **Talva II 18**

| Feløg | Kvinnur | Menn | Tils. | Pct. kvinnur |
|---|---|---|---|---|
| Akademikarafelag Føroya (AKF) | 24 | 5 | 29 | 83% |
| Bioanalytikarafelagið | 29 | 2 | 31 | 94% |
| Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya | 7 | 4 | 11 | 64% |
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 340 | 3 | 343 | 99% |
| Føroya Pedagogfelag | 1 | | 1 | 100% |
| Føroyskir Fysioterapeutar og Ergotera. | 21 | 3 | 24 | 88% |
| HAK - Havnar Arbeiðskvinnufelag, alm. | 49 | 2 | 51 | 96% |
| Havnar Arbeiðarafelag, privat | | 1 | 1 | 0% |
| Heilsurøktarafelagið, Fíggjarmálaráðið | 21 | 5 | 26 | 81% |
| Heilsurøktarafelagið, KAF | 1 | | 1 | 100% |
| Hjálparlæknaráð Føroya | 25 | 13 | 38 | 66% |
| Kommunulæknar | 1 | | 1 | 100% |
| Kost- og Føðslufelagið | 12 | 5 | 17 | 71% |
| Ljósmøðrafelag Føroya | 29 | | 29 | 100% |
| Maskinmeistarafelag Føroya | | 5 | 5 | 0% |
| Serlæknafelag Føroya | 6 | 16 | 22 | 27% |
| Serlæknafelagið sáttmálasett | 12 | 6 | 18 | 67% |
| Starvsfelagið | 99 | 29 | 128 | 77% |
| Starvsfelagið. Sjúkraflutningsstarvsfólk | 4 | 25 | 29 | 14% |
| Tænastumannafelagið | 1 | | 1 | 100% |
| Tænastumannalíknandi | 1 | 2 | 3 | 33% |
| **Íalt** | **683** | **126** | **809** | **84%** |

**Kelda:** landssjúkrahúsið

## II 3.1 Neyðugur fíggjartilvøkstur á sjúkrahúsøkinum fram til 2030, um støðið frá 2020 skal haldast

Ein vøkstur upp á 52% ella næstan 1200 fólk í aldursbólkunum yvir 80 ár tey komandi 10 árini fer eisini – um støðið skal haldast – at krevja kostnaðarmiklar uppnormeringar á sjúkrahúsøkinum og í læknaviðtalum.

Óvissur eru altíð í framskrivingum, men demografisku útlitini siga okkum rættiliga týðiliga, at útreiðslutrýstið fer at vaksa, um støðið skal haldast. Væntast kann eisini eitt útreiðslutrýst vegna brúk av nýggjum og dýrari heilivági.

---

Í 2015 gjørdi Búskaparráðið eina haldførisframrokning við støðisári í 2012.[14] Hendan framrokning bygdi m.a. á uppgjørd og mett hagtøl um individuella nýtslu og veiting Heilsumálaráðsins pr. íbúgva eftir aldri (t.e. allar útreiðslur Heilsumálaráðsins býttar á árgangir). Úrslitið var m.a., at ein 65 ára gamal í miðal "kostaði" runt roknað 35.000 kr. í 2012-prísum.

Danska Búskaparráðið hevur gjørt neyvari útrokningar av samsvarandi miðaltølum fyri danska heilsuverkið. Í hesi útrokning hava upplýsingar frá telduskráum verið nýttar.[15] Hesar útrokningar fevndu m.a. um sjúkrahúsútreiðslur býttar á aldursbólkar. Úrslitið (ið sum nevnt var avmarkað til sjúkrahúsútreiðslur), var m.a., at **ein 65 ára gamal í miðal árliga "kostaði" 35.000 kr. í 2019-prísum.**

Vit meta, at lyklatalið 35.000 kr. kann nýtast í eini "rundari" útrokning fyri føroyska sjúkrahúsverkið:

[14] Búskaparráðið: Búskaparfrágreiðing vár 2015, s. 50
[15] De Økonomiske Råd: Dansk økonomi efterår 2019, Horsens 2019, s. 111

Donsku kanningarnar vístu m.a., at miðal heilsuútreiðslurnar fyri ein persón, sum er 65 ár, eru tvífalt so høgar sum heilsuútreiðslurnar fyri ein persón, sum er 50 ár – og at heilsuútreiðslurnar fyri ein 80 ára gamlan eru tvífalt so høgar sum heilsuútreiðslurnar fyri ein 65 ára gamlan.[16]

Samanumtikið kunnu vit tískil seta hetta upp fyri sjúkrahúsverkið, sum telur umleið 80% av samlaðu heilsuútreiðslunum í Føroyum.[17]

Ein 50 ára gamal "kostar" í miðal 17.500 kr.
Ein 65 ára gamal "kostar" í miðal 35.000 kr.
Ein 80 ára gamal "kostar" í miðal 70.000 kr.

Trotið á heilsustarvsfólki á sjúkrahúsøkinum er einki serføroyskt fyribrigdi. Framrokningar í okkara norðurlendsku grannalondum vísa, at **frá 2017 og fram til 2030 er tørvur á sløkum 30% fleiri ársverkum og 40% fleiri fram til 2040.[18]**

Sjúkrarøktarfrøðingar eru talstørsti yrkisbólkur – á sjúkrahúsum, í eldrarøkt, í almannaverki og í læknaviðtalum arbeiða sum áður nevnt umleið **750 sjúkrarøkarfrøðingar**. Ein 30% vøkstur fram til 2030 hevði vaksið hendan yrkisbólk til at telja nærum **1000 fólk**. Í sjúkrahúsverkinum starvast 394 sjúkrarøktarfrøðingar (ársverk), og ein vøkstur á 30% krevur 118 sjúkrarøktarfrøðingar afturat til sjúkrahúsverkið komandi 10 árini.

Í áliti frá Heilsumálaráði – menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið – varð roknað við, at **útreiðslurnar fara at vaksa við 120 mió. kr. frá 2016 fram til 2040 bert við støði í fólkatalsframskrivingini.[19]** Haraftrat hevur medisinska menningin væntandi eisini meirútreiðslur við sær.

**Í 2016** varð tískil væntað, at tørvurin øktist 11 til 17 mió. krónur um árið **fram til 2040.**[20]

[16] Álit – Menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið, heilsu- og innlendismálaráðið, Tórshavn 2016, s. 14
[17] Álit. op. cit., s. 17-18
[18] Ibid.
[19] Ibid s. 75
[20] Ibid. s. 76

## II 4 Almannaverkið

Sambært útrokning hjá Almannaverkinum er tørvur á 500 fulltíðar starvsfólkum afturat verandi starvsfólkahópi komandi 10 árini vegna demografisku broytingar og nýtt virksemi. Harafturat væntast 200-300 at fara frá vegna aldur komandi 10 árini.

Almannaverkið er landsstovnur, sum umsitur eina røð av almannatænastum til borgarar kring alt landið. Eldrarøktina umsita kommunurnar. Í oktober 2020 arbeiddu 1059 fólk úr øllum pørtum av landinum á stovninum[21]. Nærum ein triðingur av fíggjarlógini viðvíkur Almannaverkinum.

Almannaverkið er skipað í fýra deplar: (1) trivnaðardepil S fyri sálarsjúk, autismu og seinheilaskaða, (2) trivnaðardepil M fyri barnavernd, fjølbrek, menningartarn o.o. brek, (3) viðskiftadepil, ið m.a. fevnir um útvent samskifti, (4) og ein fyrisitingardepil. Starvsfólkabýtið á hesar deplar er víst í talvu II 19.

**Býti av starvsfólkið á bygnað hjá almannaverkinum** **Talva II 19**

| | Tal av fólki | Pct býti |
|---|---|---|
| Viðskiftadepil | 115 | 11% |
| Fyrisiting | 33 | 3% |
| Trivnaðardepil M | 525 | 50% |
| Trivnaðardepil S | 386 | 36% |
| **Íalt** | **1059** | **100%** |

**Kelda:** Almannaverkið

Í oktober 2020 arbeiddu í alt 1059 starvsfólk á Almannaverkinum. Størsti starvsfólkabólkur í Almannaverkinum eru námsfrøðingar[22], ið umboðaðu heili 63% av øllum starvsfólkunum, og sostatt er Pedagogfelagið mest umboðaði starvsbólkur í Almannaverkinum. Næst í umboðan vóru Starvsfelagið (10%) og Heilsurøktarafelagið (7%), sí talvu II 20.

**Býti av starvsf. hjá Almannaverkinum á feløg** **Talva II 20**

| Felag | Tal av fólki | Pct býti |
|---|---|---|
| Føroya Pedagogfelag | 669 | 63% |
| Starvsfelagið | 105 | 10% |
| Heilsurøktarafelag | 76 | 7% |
| Heilsuhjálparafelag | 32 | 3% |
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 36 | 3% |
| Føroyskir fysioterapeutar og ergoterapeutar | 36 | 3% |
| Tilsamans størru feløgini | 954 | 90% |
| Onnur feløg | 105 | 10% |
| **Íalt** | **1059** | **100%** |

**Kelda:** Almannaverkið

Almannaverkið upplýsir eisini, at av hesum 669 fólkum, ið fevnd eru av sáttmála við Føroya Pedagogfelag, hava 373 (54%) útbúgving sum **námsfrøðingar**, og 296 (46%) eru **hjálparfólk** við ongari útbúgving. Hetta er eitt avskeplað býti, men ikki so avskeplað sum í kommunalu dagstovnaøkinum[23].

Sum hjá øðrum umsorganarstørvum er **kynsbýtið** millum tey 1059 starvsfólkini í Almannaverkinum sera skeiklað. Av hesum 1059 starvsfólkunum í Almannaverkinum eru 180 (17%) menn, og 879 (83%) kvinnur[24]. Kynsbýtið er tó javnari enn á eldraøkinum og á kommunala dagstovnaøkinum[25].

[21] Sí næstu talvu.

[22] Íroknað hjálparfólk, ið verða lønt eftir sáttmála við Pedagogfelagið

[23] Sí avsnittið um barnamenning

[24] Kelda: Almannaverkið

[25] Sí avsnittið um eldrarøktina og barnamenning (dagrøktina).

Í Føroyum er ongin munur á útbúgvingina av námsfrøðingum og útbúgvingina av sosial-námsfrøðingum og báðir bólkar eru í sama felag. Í Danmark eru 2 feløg við hvør sínum sáttmála. Í Føroyum er eingin lønarmunur, men munur á pensiónsinngjaldi[26].

Av teimum 1.059 starvsfólkunum í oktober 2020 vóru 689 (65%) **fastlønt**, og 307 (29%) ***tímalønt***, og 6% vóru bæði tímalønt og fastlønt[27].

Almannaverkið upplýsir at hesi umrøddu 1059 starvsfólk umboða 736 ársverk. Hetta gevur ein miðal **starvsbrøk,** sum fyri alt Almannaverkið er 0,69. Hesin brøkur bendir á rættuliga nógv parttíðararbeiði. Tilsvarandi brøkur fyri Landssjúkrahúsið var 0,86 í 2019[28]. Fleiri fólk á parttíð merkir ein vaksandi mun á starvsfólkatal og ársverkstal. Hesin munur er - ímóti ynski leiðslunnar - vaksin seinastu árini.

Seinastu nógvu árini eru fleiri nýggjar tænastur lagdar afturat virkseminum hjá Almannaverkinum (eldrapsykiatri, demensøkið, teknimálstulking, autisma, ADHD, seinheilaskadd, heimaráðgeving, viðlíkahaldsvenjing o.a.). Hesar nýggju tænastur merkja sjálvsagt eisini fleiri starvsfólk og eitt størri trýst á útreiðslurnar hjá Almannaverkinum.

Umframt hetta er ein øking samtíðis hend í verandi tænastuveitingum. Í seinastuni eru 68 búpláss netto komin afturat, og talið av borgarum, ið fáa tænastur frá Almannaverkinum, er í seinastuni vaksið við 115. Síðan oktober 2015 er starvsfólkatalið eisini vaksið við 270 fólkum ella 35%. Psykiatriøkið og autismuøkið er vaksið stórliga, úr 80 upp í 220 familjur, og hetta krevur økta arbeiðsorku.

Sum støðan hjá Almannaverkinum er nu, bíða 150 borgarar eftir búplássi. Við kunnleika til eftirspurningin eftir búplássum, (og eisini til játtanina til útboð av búplássum,) roknar Almannaverkið við, at hesin bíðilistin ikki fer at minka, men heldur fer at vaksa við umleið 50-70 fólkum[29] komandi 5 árini. Hetta er óhugaligt hjá teimum, ið hava staðið á bíðilista í mong ár.

**Almannaverkið hevur 240 bústaðir í dag, 76 matriklar kring landið, og hevur tørv á 486 nýggjum bústøðum innan 10 ár[30].**

Sambært innanhýsis útrokningum hjá Almannaverkinum verður tørvur á 50 starvsfólkum afturat um árið næstu árini vegna demografiskar broytingar og nýtt virksemi. Harafturat væntar Almannaverkið at 20-30 starvsfólk fara á pensjón um árið. Hetta merkir **ein útveganartørv upp á 60-80 starvsfólk um árið næstu árini**. Trupult er at ímynda sær, hvaðan hesi 60-80 fólkini árliga skulu koma, samstundis sum Almannaverkið kappast við sjúkrahúsverkið og kommunala geiran um at fáa starvsfólk.

Leiðslan á Almannaverkinum roknar við, at ein starvsfólkavøkstur sum undanfarin ár ikki fer at bera til í longdini, og at neyðugt verður í staðin við nýhugsan á økinum. Nógv av verandi búplássum eru ikki bygd til endamálið, og kunnu tískil á ongan hátt hátt styðja upp undir produktivitetsbetringar í arbeiðinum við búfólkum og øðrum klientum. Hetta ger tænastur frá almannaverkinum kostnaðarmiklar enn neyðugt hevði verið, um fysisku karmarnir vóru sum eftirynskt. Neyðugt verður frameftir at leggja størri dent á at skapa stórrakstarfyrimunir í arbeiðinum, og at stimbra fakliga umhvørvið og fakliga trivnaðin millum starvsfólkini, soleiðis at útskiftingin av starvsfólki verður minni[31].

---

[26] Kelda: Føroya Pedagogfelag

[27] Kelda: Almannaverkið

[28] Kelda: Landssjúkrahúsið

[29] Tvs. tvørrandi búplássum.

[30] Kelda: Almannaverkið

[31] Allir framman fyri standandi upplýsingar stava frá powerpoint-framløgu eftir Edvard Heen, stjóra í Almannaverkinum.

**Aldursbýti hjá starvsfólkum í Almannaverkinum** **Mynd II 6**




**Kelda:** Almannaverkið

Aldursbýtið á starvsfólkahópinum hevur eisini týdning fyri starvsfólkaumferðina – ella fyri hvussu lætt ella tungt tað verður at manna tænastuveitingarnar frameftir. Mynd II 6 vísir aldursbýtið á øllum starvsfólkahópinum hjá Almannaverkinum. Grafurin váttar, at nógv starvsfólk væntast at fara frá fyri aldur komandi 10 árini.

Um tað bert verður hugt eftir aldursbýtinum hjá teimum 76 heilsurøktarum í Almannaverkinum, umboða tey sum eru 50 ár og eldri heili 60% av øllum heilsurøktarum.

## II 4.1 Útreiðslutrýstið í Almannaverkinum

At gera upp talið av viðskiftafólkum hjá Almannaverkinum er ikki so einfalt. Búplássini sum Almannaverkið veitir viðskiftafólkum sínum kring landið, eru bert ein av fleiri tænastusløgum. Hesi búplásss eru sum nevnt 240 í tali, og innan 10 ár skulu **486 búpláss leggjast afturat**. Hetta tal kann møguliga viðvíkjandi tænastu-intensiteti sammetast við tey núverandi 645 búplássini[32] hjá eldrarøktini, og tey 194 seingjaplássini hjá sjúkrahúsverkinum[33].

Ein framrokning av fólkatalinum kann ikki brúkast til at framrokna ella meta um eitt komandi manningartørv og útreiðslutrýst í Almannaverkinum.

Almannaverkið roknar sum áður nevnt við einum **vøkstri upp á 50 starvsfólk netto um árið**, umframt at tað væntast **20-30 starvsfólk at fara frá um árið vegna aldur**.

Hetta gevur ein rekrutteringstørv upp á 60-80 starvsfólk um árið[34].

Um vit leggja tølini saman **hevur Almannaverkið næstu 10 árini tørv á at útvega 500 fulltíðarstarvsfólk.**

[32] Sí talvu II 5

[33] Rigsombudsmanden på Færøerne, årsberetning 2020, side 246

[34] Kelda: metingar hjá ovastu leiðsluni í Almannaverkinum

Leiðslan á Almannaverkinum er av tí fatan, at peningajáttanir einsamallar ikki eru nóg mikið til at nøkta tænastutørvin. Tað eru starvsfólk ið tróta, og Almannaverkið veit ikki, hvar tey skulu finna hesi starvsfólk.

Avsnit 7 lýsir hvussu nógv útbúgva seg innan vælferðarøkið.

## II 5 Barnamenning

Framrokningar av barnatalinum í aldursbólkinum 0-6 ár, sum eru børn í vøggustovu og barnagarði vísa eina støðuga gongd, eins og børn í aldursbólkinum 7-16 ár, meðan bólkurin av fólki yvir 67 ár vísir ein týðiligan vøkstur frá umleið ár 2010 og fram, sí mynd II 7a. Tískil hevur demografiska gongdin við sær ein vøkstur av eldri fólki, meðan barnatalið heldur sær støðugt. Tískil væntast ikki eitt stórvegis hægri trýst á barnamenningarøkið vegna tal av børnum í framtíðini, tó uttan at kunna siga tað við vissu, tí fólkatalsframrokningin fyri hendan aldursbólkin er tengd at óvissu vegna avmarkaða vitan um framtíðar burðartøl og konjunkturar.

**Fólkatalsframskriving fyri úrvaldar aldursbólkar árini 1985-2030** **Mynd II 7a**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Hetta evnið hevur fingið felagsheitið "barnamenning" – Hagstova Føroya nýtir sama heitið. Orðið "barnamenning" sipar til, at hetta arbeiðið við børnum ikki bara snýr seg um barnaansing, men eisini um at menna og at menta[35] børnini.

Nógv børn eru á leið 8 tímar um dagin á stovni. Tað er tískil sera týdningarmikið, at stovnarnir hava nakað at geva børnunum, ið kann menna og menta tey.

[35] T.e. "kultivera"

Kommunurnar umsita barnamenningarøkið og bjóða út pláss við givnum brúkaragjaldi.[36] Børnini á barnamenningarøkinum eru frá vøggustovualdur til 3. skúlafloksaldur. Út frá hesum hava vit valt aldurspennið 0-9 ár.
Stovnarnir til barnamenning eru avgerandi fyri møguleikan hjá foreldrum at vera á arbeiðsmarknaðinum.
Starvsfólkabólkarnir á barnamenningarøkinum eru námsfrøðingar, námsfrøðiligir atstøðingar,[37] hjálparfólk og dagrøktarmammur.[38]
---
Á mynd II 7b sæst, hvussu nógv børn í aldrinum 0-9 ár vóru innskrivað á dagstovnum, í frítíðarskúlum og í dagrøkt kring alt landið frá 2004 til 2020.

Nýtslan av dagrøkt er minkað stórliga, men nýtslan av frítíðarskúlum og serliga dagstovnum er vaksin.
Fyrr var dagrøktin ein størri partur av barnamenningarøkinum, men er og hevur verið undir avtøku í flestu kommunum og verður ikki nýtt í Tórshavnar kommunu.

Tilsamans vóru 5.642 børn í aldrinum 0-9 ár innskrivað á barnamenningarøkinum í 2020. Hetta eru 1.308 fleiri børn enn í 2004, og svarar hetta til ein vøkstur upp á 30%.
Meðan vøksturin av børnum á barnamenningarøkinum frá 2004 til 2020 var 30%, hendi ein stagnatión av børnum á barnameningarøkinum frá 2011 til 2015, men frá 2015 til 2020 hevur verið ein vøkstur upp á 15%.
Í hesum føri hevur ivaleyst verið talan um ávirkan frá konjunkturum, til- og fráflyting og eisini langtíðartrendum í búskapargongdini.

**Børn (0-9ár) í dagstovnum, frítíðarskúlum og dagrøkt** **Mynd II 7b**




**Kelda:** Hagstova Føroya
**Viðm.**: Eingi tøl eru fyri ár 2009, 2013 og 2018

[36] Kvívíkar kommuna hevur tó valt at stuðla barnafamiljur við ikki at krevja brúkaragjald
[37] Námsfrøðiligir atstøðingar hava lokið eina 2 ára útbúgving (Heilsuskúlin í Hovi)
[38] Dagrøkt við dagrøktarmammum verður ikki longur nýtt í Tórshavnar Kommunu, men verður tó enn nýtt í einstøkum kommunum

**Barnatal og børn á stovni** **Talva II 21**

| Ár | Barnatal 0-10 ár | Børn á stovni | %-partur á stovni |
|---|---|---|---|
| 2004 | 7916 | 4338 | 55% |
| 2005 | 7927 | 4573 | 58% |
| 2006 | 7883 | 4695 | 60% |
| 2007 | 7841 | 4621 | 59% |
| 2008 | 7764 | 4894 | 63% |
| 2010 | 7674 | 5052 | 66% |
| 2011 | 7610 | 4959 | 65% |
| 2012 | 7424 | 4911 | 66% |
| 2014 | 7368 | 4915 | 67% |
| 2015 | 7382 | 4947 | 67% |
| 2016 | 7384 | 5010 | 68% |
| 2017 | 7509 | 5260 | 70% |
| 2019 | 7807 | 5623 | 72% |
| 2020 | 7862 | 5666 | 72% |

**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar
**Viðm.:** Eingi tøl eru fyri 2009, 2013 og 2018

Talva II 21 vísir barnatal, og hvussu stórur partur av samlaða barnatalinum í aldrinum 0-9 ár var á barnamenningarstovni árini 2004 til 2020.
Í 2004 vóru 60% av øllum børnum í aldrinum 0-9 ár á barnamenningarstovni, og í 2020 vóru tey 79%. Hesin vøkstur stavar ikki frá einum vøkstri í barnatalinum í aldrinum 0-9 ár. Hesin vøkstur stavar frá, at nógv fleiri børn og teirra familjur gera brúk av barnamenningarstovnum í 2020 samanborið við 2004.
---
Mynd II 8 vísir, hvussu nógv starvsfólk arbeiddu á dagstovnum, í frítíðarskúlum og í dagrøkt kring landið árini 2004 til 2020.

Sambært Hagstovuni eru øll starvsfólkini á barnamenningarøkinum fevnd av hagtølunum – t.e. ikki bert námsfrøðingar og hjálparar, men eisini leiðarar og onnur starvsfólk, so sum reingerðarfólk, húsarvørðar, skrivstovufólk o.s.fr.

Í 2020 arbeiddu tilsamans 1.588 starvsfólk á barnamenningarøkinum. Hetta eru 438 fleiri starvsfólk enn í 2004 og svarar til ein vøkstur upp á 38%.
Av øllum starvsfólkum á barnamenningarøkinum í 2020 arbeiddu 44% hjá Tórshavnar Kommunu.
Lutfalsligi parturin hjá Tórshavnar Kommunu av starvsfólkatalinum á barnamenningarøkinum er minkaður 3,4 prosentstig frá 2004 til 2020, sí mynd II 9. Samstundis hevur vøksturin av børnum á barnamenningarstovni í Tórshavnar Kommunu verið næstan tann sami sum fyri alt landið frá 2004 til 2020. Fyri Búskaparráðið er ikki eyðsýnt, hvat er orsøk til hesa gongdina.

# Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini

**Starvsfólkatal á barnamenningarøkinum frá 2004 til 2020, alt landið og Tórshavn** **Mynd II 8**

Tal av løntakarum




**Kelda:** Hagstova Føroya
**Viðm.:** Eingi tøl eru fyri 2009, 2013 og 2018

**Lutfallið; starvsfólkatal í Tórshavn í mun til alt landið** **Mynd II 9**




**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar
**Viðm.:** Eingi tøl eru fyri 2009, 2013 og 2018

Talva II 22 gevur eina lýsing av starvsfólkahópinum á barnamenningarøkinum (dagstovnar, frítíðarskúlar og dagrøkt) í 2020.

Av teimum 1.588 starvsfólkunum á økinum var miðalstarvsbrøkurin 0,63 í 2020. Hetta vil siga, at miðal arbeiðstímatalið í 2020 var 63% av fullari arbeiðstíð.

Hesin lítli brøkur hevur verið nógv umrøddur og verður frá kommunalari síðu roknaður sum ein trupulleiki.

Ein orsøk til lága brøkin er, at arbeiðið við børnum sum heild er strævið, bæði sálarliga og kropsliga.[39] Føroya Pedagogfelag metir eisini, at tímatalið pr. barn er sett ov lágt. Aðrar orsøkir til, at nógv arbeiða minni enn fulla tíð, er ynskið um meira tíð til egna familju.[40]

Sambært kanning hjá Føroya Pedagogfelag frá september 2020 svaraðu 15,8% av námsfrøðingunum á dagstovnum, at teir innan fyri 12 mánaðirnar hava verið hjá lækna vegna illgruna um strongd. 12,55% av hjálparfólkinum á dagstovnum svaraðu játtandi til sama spurning. Vit hava tíverri ikki onnur arbeiðspláss at sammeta við, men er talan um darvandi strongd, so ávirkar strongdin eisini børnini negativt.[41]

---

Talva II 22 vísir eisini, hvussu nógvir námsfrøðingar og hjálparar eru á barnamenningarøkinum, og hvussu stórt lutfallið er í mun til starvsfólk tilsamans.

Fyri hjálparar var lutfallið 54% (853/1588) og fyri námsfrøðingar 31% (494/1588).

Um vit taka bólkin "onnur starvsfólk" úr, er lutfallið fyri hjálparar 60% (853/1423) og fyri námsfrøðingar 35% (494/1423).

Tá ið vit bert hyggja at dagstovnaøkinum og taka bólkin "onnur starvsfólk" úr, er lutfallið fyri hjálparar 59% (703/1200) og fyri námsfrøðingar 37% (439/1200).

Tá ið hugsað verður um, at uppgávan hjá barnamenningarstovnum er at menna og menta børnini, kann setast spurnartekin við, um hetta endamál í nóg stóran mun kann røkkast í einum strongdum umhvørvi. Bæði tí at sambært pedagogfelagnum eru ov fáir tímar settir av til hvørt barnið, og tí ov stórur partur av starvsfólkunum eru ófaklærd.

**Starvsfólk á barnamenningarøkinum í 2020, alt landið** **Talva II 22**

| Ár 2020 | Tils. | Dagstovnar | Frítíðarskúlar | Dagrøkt |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólk tilsamans | 1588 | 1333 | 208 | 47 |
| Ársverk tilsamans | 992,8 | 818,3 | 126,8 | 47,7 |
| Brøkur | 0,63 | 0,61 | 0,61 | 1,01 |
| Leiðarar | 76 | 58 | 14 | 4 |
| Námsfrøðingar (lærd) | 494 | 439 | 52 | 3 |
| Hjálparar (ólærd) | 853 | 703 | 117 | 33 |
| Onnur starvsfólk | 165 | 133 | 25 | 7 |

**Kelda**: Hagstovan.
**Viðm.**: Onnur starvsfólk eru reingerðarfólk, húsavørðar, skrivstovufólk o.s.fr.

Í dagstovnalógini §8, stk. 4 er ásett, at:

*"Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi verða 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar. Í serligum førum kann landsstýrismaðurin víkja frá hesum kravi".*

Talva II 22 og omanfyri nevndu lutfall geva greiðar ábendingar um, at hendan regla ikki verður hildin.

Við avmarkaðum dátutilfari er ikki møguligt at kanna nærri, hvussu tímarnir á einstøku dagstovnunum býta seg ímillum námsfrøðingar og hjálparfólk.

Vit hava tó spurt, hvussu tímatalið pr. barn sær út fyri Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu og Runavíkar Kommunu, sí talvu II 19. Tímatalið pr. barn um vikuna er íroknað fyrireiking og uttan servirksemi og leiðarar. Talvan vísir, at tímatalið pr. barn er nøkulunda tað sama fyri 3 tær størstu kommunurnar í landinum. Klaksvíkar Kommuna hevur tó eitt sindur lægri tímatal pr. barn.

[39] "Starvsfólk á dagstovnum – ein trivnaðarkanning" Karin Jóhanna Knudsen & Martha Mýri 2010.
[40] Ibid.
[41] Eitt strongt umhvørvi gevur ofta gróðrarbotn fyri sjálvútbreiðandi negativum ringrásum. Fólk blíva ikki strongd av nógvum arbeiði – fólk blíva strongd av tí arbeiði og teimum uppgávum, sum tey ikki náa ella megna at gera.

| Tímar pr. barn um vikuna 2021 | | | | Talva II 22a |
|---|---|---|---|---|
| | Vøggustova | Barnagarður | | Frítíðarskúli |
| Tórshavnar Kommuna | 11,07 | 6,03 | (0.fl.) | 3,45 |
| | | | (1-2 fl.) | 2,76 |
| | | | (3.fl.) | 1,38 |
| Klaksvíkar Kommuna | 10,53 | 5,71 | | 2,87 |
| Runavíkar Kommuna | 11 | 6 | | 3 |

**Kelda**: Tórshavnar Kommuna, Klaksvíkar Kommuna, Runavíkar Kommuna
**Viðm.**: Tímarnir eru uttan leiðarar og servirksemi, men við fyrireiking.

Talva II 23a vísir hvussu nógvir námsfrøðingar eru útbúnir í Føroyum frá 2008 til 2020.

Í hesum tíðarskeiði eru tilsamans útbúnir 337 námsfrøðingar, ið svarar til 26 námsfrøðingar í miðal um árið. Talið av monnum, sum útbúgva innan námsfrøði er sera lágt og konstant lágt. Tað er tí einki, sum bendir á, at fleiri menn fara at útbúgva seg námsfrøðingar í framtíðini.

| **Útbúnir námsfrøðingar 2008-2020** | | | **Talva II 23a** |
|---|---|---|---|
| Ár | Íalt | Menn | Kvinnur |
| 2008 | 27 | 1 | 26 |
| 2009 | 22 | 1 | 21 |
| 2010 | 22 | 2 | 20 |
| 2011 | 26 | 2 | 24 |
| 2012 | 32 | 1 | 31 |
| 2013 | 30 | 3 | 27 |
| 2014 | 28 | 4 | 24 |
| 2015 | 21 | 0 | 21 |
| 2016 | 23 | 1 | 22 |
| 2017 | 34 | 0 | 34 |
| 2018 | 26 | 2 | 24 |
| 2019 | 24 | | |
| 2020 | 22 | | |
| **Íalt** | **337** | **17** | **274** |

**Kelda:** Mentamálaráðið

Í Føroyum er eisini møguligt at útbúgva seg sum námsfrøðiligur atstøðingar á Heilsuskúlanum í Hovi. Hendan útbúgving tekur 2 ár, og fyrsti árgangur byrjaði í august 2020. Í hesum fyrsta árgangi eru í løtuni 7 lesandi. Tað er pláss fyri 24 næmingum pr. árgang. Mett verður at koronafarsóttin hevur ávirkað lága næmingatalið. Upprunaliga vóru fleiri umsóknir enn tey 7, sum lesa nú.

Tað eru eisini nógvir føroyingar uttanlands, ið útbúgva seg til námsfrøðing. Í skúlaárinum 2019/20 vóru í alt 36 námsfrøðilesandi, sí talvu II 23b.

| **Námsfrøðilesandi uttanlands skúlaárið 2019/20** | | | **Talva II 23b** |
|---|---|---|---|
| | Kvinnur | Menn | Íalt |
| Námsfrøðilesandi uttanlands (bachelor og kandidat) | 31 | 5 | 36 |

**Kelda:** Studni

## II 5.1 Núverandi tørvur á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu

Búskaparráðið hevur móttikið hagtøl fyri starvsfólk og starvsbrøk teirra á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu, og lýsir í hesum avsnitti tørvin á starvsfólki innan barnamenningarøkið í Tórshavnar Kommunu. Búskaparráðið hevur avmarkað seg til bert at lýsa starvsfólkatørvin innan barnamenning fyri Tórshavnar Kommunu vegna avmarkaða tíð. Sami leistur kundi tó verið nýttur til at rokna starvsfólkatørvin í øðrum kommunum eisini.

Burturav samlaða talinum av børnum í landinum í aldrinum 0-9 ár, hevur Tórshavnar kommuna meir enn 40%. Tølini fyri Tórshavnar kommunu kunnu tískil í ein vissan mun vera umboðandi fyri restina av landinum, men Búskaparráðið hevur ikki eftirkannað, hvussu talið av starvsfólki innan barnamenning er í mun til barnatalið í øðrum kommunum, og Búskaparráðið kann tískil ikki siga, um støðan í øðrum kommunum er eins og tann í Tórshavnar kommunu.

Samanumtikið vísa útrokningarnar hjá Búskaparráðnum, at Tórshavnar kommuna vantar 89 fulltíðar starvsfólk (ársverk) á barnamenningarøkinum tilsamans í januar 2021, um normeringin skal vera tann, sum Tórshavnar kommuna metir seg hava í 2020. Niðanfyri verður greitt nærri frá útrokningunum.

Á býráðsfundi í Tórshavnar kommunustýri tann 26. november 2020, vórðu normeringar á dagstovnaøkinum til umrøðu[42]. Sambært Tórshavnar kommunu var normeringin í 2020 á dagstovnaøkinum sum víst niðanfyri, og sammet varð harumframt við hækkaðu donsku krøvini, ið verða framd innan 2025 í Danmark:

**Normering í Tórshavn sammett við krøv um normering í Danmark** **Talva II 24**

| | Normering Tórshavn 2020 | Normering DK 2025 |
|---|---|---|
| Vøggustovur | 3,5 | 3 |
| Barnagarðar | 6,6 | 6 |
| Frítíðarskúlar | 14,5 | 9 |

**Kelda:** Tórshavnar kommuna

Við at samanbera tal av starvsfólki á dagstovnaøkinum við talið av børnum í ávikavíst vøggustovualdri, barnagarðsaldri og frítíðarskúlaaldri, fæst ein mynd av hvussu nógv børn eru fyri hvørt starvsfólk á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu.

Ikki øll starvsfólk innan barnamenning í Tórshavnar kommunu hava fullan starvsbrøk, og tí hevur Búskaparráðið upproknað starvsfólkini til heil ársverk. Í Tórshavnar kommunu eru umleið 80% av starvsfólkunum innan barnamenningarøkið mánaðarlønt, meðan 20% eru tímalønt. Í samlaða talinum av starvsfólki er ein partur av teimum tímaløntu tald við, upproknað til heil ársverk. Uppií teimum tímaløntu kunnu millum annað reingerð og køkshjálp vera, umframt vikarar, og hesi eru tískil ikki øll somul starvsfólk, ið taka sær av barnamenning. Búskaparráðið hevur tí valt bert at telja 40% av teimum tímaløntu ársverkunum við í samlaða starvsfólkahópin innan barnamenning í Tórshavnar Kommunu. Tey tímaløntu, ið eru tald við, svara til umleið 24 ársverk.

Barnatalið í aldrinum 0-2 ár umboða vøggustovualdur og tey 3-6 ára gomlu umboða barnagarðsaldur, meðan tey 7-9 ára gomlu umboða børn í frítíðarskúla. Børn, ið eru 0 - 1 ára gomul tann 1. januar 2021 eru tald við sum børn, ið hava tørv á dagstovnaplássi í inniverandi árið. Tó er bert helvtin fødd í 2020, ið sostatt hava aldur til at kunna fara á stovn í inniverandi árinum, og tí er hin helvtin av teimum 0 ára gomlu drigin frá. Summi av teimum 0 – 1 ára gomlu, ið eru tald við fara møguliga kortini ikki á stovn í inniverandi árinum, men hetta er ikki mett at geva stóra óvissu, tí tilgongdin av teimum 0-1 ára gomlu er mett at svara til frágongdina av børnum í inniverandi árinum. Tað vil siga at talið av børnum, sum í inniverandi árið fara úr vøggustovu í barnagarð, úr barnagarði í skúla, ella úr frítíðarskúla vegna aldur og sostatt úr samlaða

[42] Við normering meinast tal av børnum pr. starvsfólk, til dømis 3,5 børn til 1 fulltíðarstarvsfólk í vøggustovum, og jú lægri normeringstal, jú betri góðska.

talinum av børnum í 0-9 ára aldri, svara nøkulunda til tilgongdina av teimum 0-1 ára gomlu í inniverandi árið.

| **Tal av starvsfólki í mun til barnatal** | | **Talva II 25** |
|---|---|---|
| | | Tórshavnar kommuna |
| **Vøggustovualdur** | 0 ár | 159 |
| | 1 ár | 312 |
| | 2 ár | 335 |
| | Íalt | 806 |
| Fulltíðarstarvsfólk um normering á 3,5 skal halda | | 226 |
| **Barnagarðsaldur** | 3 ár | 290 |
| | 4 ár | 335 |
| | 5 ár | 307 |
| | 6 ár | 340 |
| | Íalt | 1272 |
| Fulltíðarstarvsfólk um normering á 6,6 skal halda | | 175 |
| Samlað barnatal (0-6 ár) | | 2078 |
| Fulltíðarstarvsfólk eiga at vera tilsamans (0-6 ár) | | 400 |
| Tórshavnar kommuna hevur | | 324 |
| Munur | | -76 |
| **Frítíðarskúlaaldur** | 7 ár | 286 |
| | 8 ár | 308 |
| | 9 ár | 288 |
| | Íalt | 882 |
| Fulltíðarstarvsfólk um normering á 14,5 skal halda | | 61 |
| Fulltíðarstarvsfólk eiga at vera (7-9 ár) | | 61 |
| Tórshavnar kommuna hevur | | 48 |
| Munur | | -13 |

**Kelda:** Hagstova Føroya, Tórshavnar kommuna og egnar útrokningar
**Viðm.**: Barnatal pr 1. januar 2021

Tveir stovnar eru sjálvsognarstovnar í Tórshavnar kommunu; tað eru Drotningar Ingridar barnagarður og Sankta Jósef barnagarður, og talið av børnum, sum hesir stovnar hava pláss fyri í ávikavíst vøggustovu og barnagarði, eru tískil tikin burturúr samlaða talinum av børnum. Starvsfólk á hesum báðum stovnum teljast somuleiðis ikki við í samlaða talinum av starvsfólki innan barnamenning í Tórshavnar kommunu.

Ein normering á 3,5 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk vøggustovunum krevur 226 ársverk, og ein normering á 6,6 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk í barnagørðunum í Tórshavnar kommunu krevur 174 ársverk. Tað vil siga 400 ársverk tilsamans, meðan Tórshavnar Kommuna bert hevur 324 ársverk í vøggustovunum og barnagørðunum tilsamansm sí Talvu 25. Tølini benda tískil á, at normeringin, sum Tórshavnar kommuna metir seg hava í 2020, ikki er røtt.

Hesar útrokningar hjá Búskaparráðnum vísa sostatt, at Tórshavnar kommuna vantar 76 fulltíðar starvsfólk (ársverk) í vøggustovunum og barnagørðunum tilsamans í januar 2021, um normeringin er 3,5 barn í vøggustovunum fyri hvørt fulltíðar starvsfólk (ársverk) og 6,6 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk í barnagørðunum, sí Talvu II 25. Harafturat vantar Tórshavnar kommunu 13 ársverk í frítíðarskúlunum, um normeringin er 14,5 børn fyri hvørt ársverk, tað vil siga 89 ársverk tilsamans skulu til fyri at røkka normeringina, ið Tórshavnar kommuna metir seg hava í 2020.

Skal starvsfólkabýtið vera 2/3 námsfrøðingar eins og ásett er í Dagstovnalógini §8, stk. 4, skulu í minsta lagið 307 av teimum tilsamans (400+61) ársverkunum á barnamenningarøkinum vera námsfrøðingar, og restin hjálparfólk.

Afturat hesum, skal talið av teimum starvsfólkum, sum eru 60 ár ella eldri, leggjast, tí hesi væntast at fara úr arbeiðsmegini komandi 10 árini. Leiðarar, námsfrøðingar, hjálparfólk og tímalønt sum tann 1. januar 2021 eru 60 ár ella eldri, svara til 36 ársverk.

Hevur Tórshavnar kommuna hinvegin ynski um at røkka donsku normeringunum á 3 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk í vøggustovunum, 6 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk í barnagørðunum og 9 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk í frítíðarskúlunum, krevur tað ístaðin 455 ársverk til vøggustovurnar og barnagarðarnar tilsamans, og 98 ársverk til frítíðarskúlarnar. Hetta merkir, at Tórshavnar kommuna tørvar 181 starvsfólkum tilsamans innan barnamenningarøkið fyri at røkka hesum málið um normering, sí Talvu II 26.

Av øllum ársverkunum tilsamans (455+98) eiga í minsta lagið 369 ársverk vera námsfrøðingar og restin hjálparfólk, um starvsfólkabýtið skal vera 2/3 námsfrøðingar, eins og ásett í dagstovnalógini.

Flestu starvsfólkini innan barnamenningarøkið í Tórshavnar kommunu arbeiða niðursetta tíð, og sambært trivnaðarkanning frá 2010, er ein av høvuðsorsøkunum, at tað er ov strævið at arbeiða fulla tíð á dagstovni[43]. Hugsast kann, at um flestu av verandi starvsfólkum á dagstovnaøkinum fóru upp í tíð, hevði samlaða arbeiðsorkan hækkað, soleiðis at tað í roynd og veru vóru fleiri vaksin fyri hvørt barnið, ið alt annað líka hevði havt við sær, at arbeiðsbyrðan hevði lættað hjá hvørjum einstøkum starvsfólki.

[43] "Starvsfólk á dagstovnum – ein trivnaðarkanning" Karin Knudsen & Martha Mýri 2010.

**Tal av starvsfólki í mun til barnatal** **Talva II 26**

| | | Tórshavnar kommuna |
|---|---|---|
| **Vøggustovualdur** | 0 ár | 159 |
| | 1 ár | 312 |
| | 2 ár | 335 |
| | Íalt | 806 |
| Fulltíðarstarvsfólk um normering á 3 skal halda | | 263 |
| **Barnagarðsaldur** | 3 ár | 290 |
| | 4 ár | 335 |
| | 5 ár | 307 |
| | 6 ár | 340 |
| | Íalt | 1272 |
| Fulltíðarstarvsfólk um normering á 6 skal halda | | 192 |
| Samlað barnatal | | 2078 |
| Fulltíðarstarvsfólk eiga at vera tilsamans (0-6 ár) | | 455 |
| Tórshavnar kommuna hevur | | 324 |
| **Munur** | | **-131** |
| **Frítíðarskúlaaldur** | 7 ár | 286 |
| | 8 ár | 308 |
| | 9 ár | 288 |
| | Íalt | 882 |
| Fulltíðarstarvsfólk um normering á 9 skal halda | | 98 |
| Fulltíðarstarvsfólk eiga at vera (7-9 ár) | | 98 |
| Tórshavnar kommuna hevur | | 48 |
| **Munur** | | **-50** |

**Kelda:** Hagstova Føroya, Tórshavnar kommuna og egnar útrokningar
**Viðm.**: Barnatal pr 1. januar 2021

Á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu arbeiða umleið 8,5% av námsfrøðingunum fulla tíð og av hjálparfólkunum eru tað um 3%, ið arbeiða fulla tíð. Hjá leiðarum er tað meira vanligt at arbeiða fulla tíð; umleið 70% av leiðarunum arbeiða fulla tíð, sí Mynd II 10. Um verandi námsfrøðingar og hjálparfólk fóru upp í tíð, var ikki neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at skaffa heili 89 ársverk fyri at hava ta normering, sum kommunan metir seg hava í 2020, men færri, tí verandi starvsfólk høvdu verið betri útnyttaði.

**Starvsfólk á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu býtt á fulla ella niðursetta tíð** **Mynd II 10**




**Kelda:** Tórshavnar kommuna

Burturav námsfrøðingunum, sum starvast innan dagstovnaøkið (vøggustovu og barnagarð) í Tórshavnar kommunu, eru tey mánaðarløntu 152 í tali, og tey svara til 115 ársverk. Høvdu hesir 152 mánaðarløntu námsfrøðingarnar arbeitt fulla tíð, hevði tað givið 37 ársverk afturat.

Hjálparfólk, ið eru mánaðarlønt á dagstovnaøkinum eru 256 í tali og svara til 193 ársverk. Høvdu hesi 256 hjálparfólk arbeitt fulla tíð, hevði tað givið 63 ársverk afturat.

Høvdu allir mánaðarløntir námsfrøðingar og hjálparfólk á dagstovnaøkinum arbeitt fulla tíð, hevði tað soleiðis givið tilsamans 63+37 = 100 ársverk[44] afturat, og tá hevði Tórshavnar kommuna ikki mangla starvsfólk á dagstovnaøkinum fyri at røkka normeringina, ið Tórshavnar kommuna metir seg hava í 2020.

Búskaparráðið metir ikki tað vera realistiskt, at øll starvsfólk á dagstovnaøkinum høvdu arbeitt fulla tíð, um tey fingu møguleikan, og tí er hetta bert eitt hugsað roknistykki. Búskaparráðið metir tó, at tað alt annað líka hevði verið meira attraktivt hjá starvsfólki innan dagstovnaøkið at havt hægri starvsbrøk, um normeringin var lægri og lønarlagið hægri, umframt at hetta í størri mun hevði drigið arbeiðsmegi at dagstovnaøkinum og fasthildið hana á hesum øki.

Mynd II 11 niðanfyri bendir á, at tað er ringt at fasthalda námsfrøðingar á barnamenningarøkinum, tá starvsfólkini fara uppum 50 ár. Stabbarnir vísir starvsfólk á barnamenningarøkinum býtt á starvsheiti og á 10-ára aldursbólkar. Bláa strikan vísir hvat miðal starvsbrøkurin er í ymsu aldursbólkunum; sum tað sæst í myndini, fellur starvsbrøkurin við aldrinum.

[44] Roknað verður bert út frá teimum mánaðarløntu á dagstovnaøkinum (vøggustovu og barnagarði), tí í frítíðarskúlunum verður ikki arbeitt fulla tíð av tí at frítíðarskúlar bert eru opnir seinnapartar. Fyri at vera tímaløntur, kann ein bert starvast undir 15 tímar um vikuna ella vera settur í styttri enn 3 mðr, og tað gevur tíksil ikki meining at gera eitt roknistykki, har tímalønt verða sett til at hava fullan starvsbrøk.

**Starvsfólk á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu býtt á 10 ára aldursbólkar** **Mynd II 11**




**Kelda:** Tórshavnar kommuna

Í mynd II 11 sæst, at størstiparturin av yngru aldursbólkunum eru hjálparfólk. Hetta kann partvíst skyldast at nógv ung taka eitt fyribils starv áðrenn tey eitt nú byrja at lesa. Í aldursbólkinum 30-39 er meir enn helvtin av starvsfólkunum námsfrøðingar, og í 40-49 aldri eru summir av námsfrøðingunum vorðnir leiðarar. Í 50-59 ára aldri fara serliga námsfrøðingar, men eisini leiðarar úr sínum størvum innan barnamenningarøkið, og verða partvíst erstattaðir av hjálparfólki. Í 60-69 ára aldri eru uppaftur fleiri námsfrøðingar og leiðarar, men eisini nøkur hjálparfólk, farin úr sínum starvi á barnamenningarøkinum. Hetta kundi bent á ov stóra arbeiðsbyrðu og/ella ov lágt lønarlag samanborið við onnur størv. Møguliga leita summi av hesum starvsfólkum sær til størv í almannaverkinum ella aðrastaðni, har minni krevjandi arbeiði krevst fyri somu løn, ella hægri løn fæst fyri somu arbeiðsbyrðu, sum tann á barnamenningarøkinum.

**Starvsfólk á barnamenningarøkinum í Tórshavnar kommunu býtt á aldur** **Mynd II 12**




**Kelda:** Tórshavnar kommuna

Í yngru aldursbólkunum er nógv tann størsti parturin hjálparfólk, sí Mynd II 12. Umframt at tey eru ófaklærd, ger stutti starvsaldurin, at henda arbeiðsmegin er tann minst kostnaðarmikla. Nakað kundi týtt á, at stovnarnir í Tórshavnar kommunu hava ringt við at fáa faklærda arbeiðsmegi, men eisini halda útreiðslunum niðri við at nýta ófaklærda arbeiðsmegi. Spurningurin er tó, um tað onkursvegna hevði lættað um samlaðu arbeiðsbyrðuna á dagstovnunum, um 2/3 av starvsfólkunum vóru faklærd. Eisini kann hugsast,

at tað bæði hevði tiltrekt arbeiðsmegi, serliga faklærda arbeiðsmegi, og gjørt tað meira attraktivt at havt hægri starvsbrøk, um 2/3 av starvsfólkunum innan barnamenningarøkið vóru námsfrøðingar.

Í Tórshavnar kommunu eru 64% av starvsfólkunum innan barnamenning hjálparfólk, meðan 29% eru námsfrøðingar og 7% eru leiðarar.
Sambært Tórshavnar kommunu var normeringin í 2020 3,5 børn fyri hvørt vaksið fólk í vøggustovunum, 6,6 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk í barnagørðunum og 14,5 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólk í frítíðarskúlunum, sí Talvu 10, men sambært útrokningum hjá Búskaparráðnum vantar Tórshavnar kommunu 89 ársverk fyri at røkka hesi normering, sí Talvu 11.

Búskaparráðið hevur tískil roknað normeringina á dagstovnunum og frítíðarskúlunum í Tórshavnar kommunu út frá núverandi talið av fulltíðar starvsfólki á barnamenningarøkinum, tað vil siga roknað hvussu nógv børn eru fyri hvørt ársverk í dagstovnunum og frítíðarskúlunum í mun til talið av børnum í 0-9 ára aldri, íroknað tímalønt starvsfólk[45], men leiðararnir eru ikki íroknaðir. Normeringin tann 1. januar 2021 hevur Búskaparráðið sostatt roknað til at vera 4,3 børn í vøggustovunum fyri hvørt fulltíðar starvsfólk (ársverk), 8,5 børn fyri hvørt fulltíðar starvsfólkið í barnagørðunum og 18,4 børn í frítíðarskúlunum fyri hvørt fulltíðar starvsfólkið. Hesti tøl fyri normeringar eru miðaltøl fyri barnamenningarøkið í Tórshavnar kommunu, tað merkir at á summum stovnum í Tórshavnar kommunu stendur betri til viðvíkjandi normaringar, meðan tað á summum stovnum stendur verri til.

Høgu normeringarnar kunnu millum annað forklárast av stóru tilflytingingini seinastu fleiri árini, ið millum annað hevur lagt eitt stórt trýst dagstovnaøkið og givið eitt trot á bústaðarmarknaðin. Tórshavnar kommuna hevur onkursvegna ikki megnað at fylgt við stóru tilflytingini og játtað ta fígging, ið skal til fyri at fáa sett neyðuga talið av starvsfólki á barnamenningarøkinum.
Summar kommunur hava strikað ella lækkað foreldragjaldið fyri stovnspláss. Hesar kommunur hava eyga fyri, at ungar familjur við børnum, sum skulu útvega bústað og ansingarpláss til børn, eru hart sperdar fíggjarliga.
0
Fíggjarliga trýstið á ungar familjur er høgt í øllum landinum og ikki minst í Tórshavn, tí at tað er dýrt at útvega bústað, og eisini er tað kostnaðarmikið at hava børn. Tað eru tí slíkar familjur, ið ringast tola eitt høgt skattatrýst. Seinni í lívinum er ofta størri fíggjarligt rásarúm. Tað skuldi tí verið umhugsað at hækkað skattin við tí fyri eyga at uppraðfest barnamenningarøkið og samstundis hækkað barnafrádráttin.

[45] Av tí at summi av teimum tímaløntu ársverkunum kunnu vera eitt nú køkshjálp og reingerð, ið Búskaparráðið ikki fær sáldað burturúr hagtølunum, hevur Búskaparráðið valt at telja 40% av teimum tímaløntu við, ið svara til 24 ársverk.

## II 6 Fólkaskúlaøkið

Hetta brotið snýr seg um næmingar og lærarar í fólkaskúlanum. Talið av børnum í aldrinum 7-16 ár hevur eina støðuga gongd, og tískil er fólkaskúlin ikki mettur at hava avbjóðingar hesum viðvíkjandi.

Talva II 27 og mynd II 14 geva eina útgreining og samanteljing av næmingabýtinum og lærarabýtinum í fólkaskúlanum í 2020/21. Tað vil siga, býtið av næmingum og lærarum á teir ymsu skúlarnar og árgangirnar í 2020/21.

Næmingatalið pr. lærarastarv er sum vera man ymiskt í einstøku skúlunum; hetta talið sæst at vera treytað av skúlastøddini og av, hvussu nógvar árgangir undirvísing skúlans fevnir um. Tað er eisini treytað av savning av 10. flokki á teimum størru skúlunum. Talvan og myndin geva annars ikki høvi til serligar viðmerkingar.

# Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini

**Talva II 27**

| **Fólkaskúlin SKÚLAR** | **Árgangir 2020/21** | | | | | | | | | | | **Sett størv 01.08.20** | **Næmingatal íalt 2020/21** | Næmingatal pr starv |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1. fl. | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | 10. fl. | ser. | | | |
| **Skúlin á Fløtum** | 60 | 73 | 48 | 63 | 59 | 74 | 75 | 146 | 109 | | 33 | **62** | **740** | 11,9 |
| **á Skúlatrøð** | 63 | 77 | 63 | 64 | 67 | 74 | 67 | 69 | 80 | 57 | 34 | **61** | **715** | 11,7 |
| **Eysturskúlin** | 21 | 40 | 22 | 30 | 32 | 36 | 38 | 33 | 60 | 166 | 6 | **46** | **484** | 10,5 |
| **Runavíkar skúli** | 40 | 30 | 41 | 35 | 34 | 39 | 35 | 51 | 60 | 30 | 18 | **37** | **413** | 11,2 |
| **Skúlin við Løgmannabreyt** | 38 | 34 | 47 | 34 | 49 | 53 | 51 | 47 | 50 | | | **35** | **403** | 11,5 |
| **Hoyvíkar skúli** | 35 | 36 | 33 | 46 | 23 | 37 | 37 | 37 | 37 | | 15 | **29** | **336** | 11,6 |
| **Skúlin á Giljanesi** | 35 | 22 | 32 | 28 | 32 | 31 | 27 | 34 | 32 | 16 | | **30** | **289** | 9,6 |
| **Skúlin á Argjahamri** | 35 | 34 | 47 | 42 | 48 | 42 | 43 | 28 | 42 | | | **31** | **361** | 11,6 |
| **Skúlin við Streymin** | 15 | 4 | 12 | 28 | 24 | 28 | 27 | 29 | 33 | 28 | 14 | **24** | **242** | 10,1 |
| **Fuglafjarðar skúli** | 27 | 16 | 16 | 29 | 23 | 18 | 20 | 53 | 58 | 29 | | **28** | **289** | 10,3 |
| **Tvøroyrar skúli** | 23 | 18 | 23 | 29 | 22 | 16 | 24 | 27 | 27 | 17 | 7 | **22** | **233** | 10,6 |
| **Sankta Frans skúli** | 44 | 48 | 46 | 47 | 43 | 47 | 43 | | | | | **25** | **318** | 12,7 |
| **Skúlin í Eysturkommunu** | 31 | 31 | 35 | 41 | 28 | 37 | 30 | | | | | **19** | **233** | 12,3 |
| **Vágs skúli** | 26 | 19 | 23 | 20 | 19 | 15 | 18 | 31 | 18 | 15 | 16 | **20** | **220** | 11,0 |
| **Tofta skúli** | 21 | 21 | 24 | 15 | 24 | 20 | 24 | 17 | 36 | 18 | | **20** | **220** | 11,0 |
| **Vestmanna skúli** | 18 | 17 | 16 | 16 | 14 | 21 | 19 | 27 | 27 | 1 | 6 | **21** | **182** | 8,7 |
| **Stranda skúli** | 15 | 13 | 15 | 12 | 12 | 16 | 17 | 12 | 15 | 6 | | **15** | **133** | 8,9 |
| **Sørvágs skúli** | 19 | 14 | 12 | 13 | 15 | 24 | 15 | 22 | 20 | 6 | 11 | **17** | **171** | 10,1 |
| **Kollafjarðar skúli** | 13 | 10 | 10 | 18 | 14 | 16 | 16 | 8 | 10 | | | **14** | **115** | 8,2 |
| **Hvalbiar skúli** | 10 | 11 | 8 | 7 | 9 | 6 | 6 | 9 | 9 | | | **9** | **75** | 8,3 |
| **Sandoyar Meginskúli** | | | | | | 15 | 17 | 19 | 24 | 13 | | **9** | **88** | 9,8 |
| **Skála skúli** | 9 | 6 | 10 | 10 | 11 | 11 | 10 | | | | | **8** | **67** | 8,4 |
| **Hvalvíkar skúli** | 11 | 3 | 9 | | | | | | | | | **4** | **23** | 5,8 |
| **Velbastaðar skúli** | 3 | 5 | 5 | 2 | 6 | 4 | 7 | | | | | **5** | **32** | 6,4 |
| **Sands skúli** | 5 | 10 | 7 | 14 | 8 | | | | | | | **5** | **44** | 8,8 |
| **Eiðis skúli** | 13 | 12 | 9 | 12 | 10 | 6 | 7 | | | | | **7** | **69** | 9,9 |
| **Kvívíkar skúli** | 7 | 9 | 7 | 6 | 7 | 9 | 7 | | | | | **5** | **52** | 10,4 |
| **Skúlin á Fossánesi** | 3 | 5 | 1 | 5 | 2 | 4 | 6 | | | | | **3** | **26** | 8,7 |
| **Viðareiðis skúli** | 7 | 3 | 4 | 6 | 5 | 9 | 6 | | | | | **4** | **40** | 10,0 |
| **Hósvíkar skúli** | 2 | 5 | 3 | | | | | | | | | **2** | **10** | 5,0 |
| **Kaldbaks skuli** | 4 | 5 | 2 | 4 | 3 | 2 | 4 | | | | | **3** | **24** | 8,0 |
| **Skopunar skúli** | 3 | 9 | 7 | 3 | 5 | | | | | | | **3** | **27** | 9,0 |
| **Nólsoyar skúli** | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | | | | | | **2** | **10** | 5,0 |
| **Porkeris skúli** | 4 | 9 | 4 | 3 | 2 | 3 | 4 | | | | | **3** | **29** | 9,7 |
| **Sumbiar skúli** | 5 | 7 | 5 | 4 | 6 | 3 | 4 | | | | | **2,75** | **34** | 12,4 |
| **Oyndarfjarðar skúli** | | 2 | | | | | | | | | | **1** | **2** | 2,0 |
| **Skálavíkar skúli** | 3 | 1 | 4 | | 2 | | | | | | | **1** | **10** | 10,0 |
| **Húsar/Syðradals skúli** | | | | | 1 | 1 | | | | | | **1** | **2** | 2,0 |
| **Haraldssunds skúli** | 3 | | 2 | | | | 1 | | | | | **1** | **6** | 6,0 |
| **Kirkju/Hattarvíkar skúli** | | | | | | 1 | | 1 | | | | **1** | **2** | 2,0 |
| **Fámjins skúli** | | | | | | 1 | | | | | | **1** | **1** | 1,0 |
| **2020/21** | **673** | **661** | **654** | **688** | **660** | **720** | **705** | **700** | **747** | **402** | **160** | **637** | **6.770** | **10,6** |
| **Frískúlin í Tórshavn** | **3** | **10** | **3** | **8** | **5** | **5** | | | | | | | **34** | |
| **Lítliskúli** | **17** | **12** | **12** | **13** | **17** | **6** | **3** | | | | | | **80** | |
| **Keldan** | **12** | **15** | **0** | **14** | **16** | **6** | **18** | | | | | | **81** | |
| **2020/21** | **32** | **37** | **15** | **35** | **38** | **17** | **21** | | | | | | **195** | |
| **Skúlin á Trøðni** | | | | | | | | | | | | | **55** | |
| **Næmingar íalt** | | | | | | | | | | | | | **7.020** | |

**Kelda:** Mentamálaráðið

**Viðm.:** Starvstalið grundað á "skipað størv" (fulla tíð), ikki írokna frískúlar og skúlan á Trøðni. Ársverk>skipað størv.

**Samanh. ml.lærarastørv (x-ás) og næm. tal (y-ás)** **Mynd II 14**




**Kelda:** Mentamálaráðið

Talva II 27 vísir at 160 næmingar fáa serundirvísing.

Sálarligi trivnaðurin millum ungfólk sigst verða vorðin nógv vánaligari seinastu árini. Hesin vaksandi mistrivnaður millum ungfólk hevur møguliga ein samanhang við tørvin á serundirvísing. Vaksandi mistrivnaðurin kann møguliga eisini hava nakað at gera við námsætlanirnar og innihaldið í undirvísingini[46].

Í ásannan av hesum vaksandi mistrivnaði samtykti Løgtingið á heysti 2020 at veita ókeypis sálarfrøðisviðgerð til øll millum 15 og 35 ár. Hetta er ein royndarskipanin, sum er mett at kosta 10 mió. kr.[47]

Búskaparráðið kann taka undir við hesi skipan sum ein royndarskipan, men Búskaparráðið má samstundis mæla til, at úrslitini av hesi royndarskipan verða vísindaliga eftirmett. Ein slík eftirmeting kostar pengar, men gevur eisini høvi til gransking. Fyri at fíggja eina slíka eftirmeting mælir Búskaparráðið til, at játtanin verður hækkað samlsvarandi. Ein eftirmeting av øllum nýskipanum er neyðug – eisini hesari.

---

Talva II 28 vísir talið á útbúnum lærarum í 13-áratíðarskeiðinum 2008-2020. Tilskiling er gjørd fyri kvinnur og menn.

Frá 2008 til 2019 hava tilsamans 332 fólkaskúlalærarar tikið prógv, hetta gevur í miðal 28 um árið.
Tað er stórbroyting hend í lutfallinum millum lærarar og lærarinnur í mun til støðuna "í gomlum døgum". Lærarayrkið er týðuliga blivið til eitt kvinnuyrkið. Spurt kann verða um orsøk og avleiðing.

Her skal ikki verða gitt um avleiðingar. Men ein orsøk hevur verið, at undirvísingarskipanin við tíðini er vorðin meira og meira bóklig og betri í samsvari við kvinnuligar yrkissiðvenjur – og tí klára kvinnur seg betri. Øvugt hesum er undirvísingarskipanin við tíðini vorðin minni praktisk-tøknilig, og tískil minni í samsvari við mannligar yrkissiðvenjur[48] - og tí klára menn seg verri.

[46] Formaður Føroya Lærarafelags í Dag og Viku 15.2.21
[47] Heilsumálaráðið, mál nr 20/00771-4
[48] https://www.denoffentlige.dk/folkeskolen-forstaerker-koensforskelle-piger-faar-bedre-karakterer-end-drenge

**Útbúnir lærarar 2008-2020** **Talva II 28**

| Ár | Íalt | Mannf. | Konuf. |
|---|---|---|---|
| 2008 | 19 | 5 | 14 |
| 2009 | 22 | 8 | 14 |
| 2010 | 24 | 7 | 17 |
| 2011 | 23 | 4 | 19 |
| 2012 | 34 | 8 | 26 |
| 2013 | 34 | 11 | 23 |
| 2014 | 33 | 8 | 25 |
| 2015 | 22 | 7 | 15 |
| 2016 | 27 | 6 | 21 |
| 2017 | 41 | 11 | 30 |
| 2018 | 27 | 13 | 14 |
| 2019 | 26 | | |
| 2020 | 22 | | |
| **Íalt** | **354** | **´(88)** | **´(218)** |

**Kelda:** Mentamálaráðið

Mynd II 15 vísur eina framrokning frá 2000 til 2030 av barnatalinum millum 7 og 16 ár, og sammett við tey 67 ára gomlu og eldri. Yvirskipað sæst ein støðug gongd fyri tey 7-16 ár gomlu. Vit vænta tí ikki eitt stórvegis hægri ella lægri trýst á fólkaskúlan vegna talið av børnum millum 7-16 ár í nærmastu framtíð.

**Fólkatalsframskriving fyri úrvaldar aldursbólkar** **Mynd II 15**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Hetta kann lýsast við einum dømi, har vit hyggja neyvari at framskrivingini frá 2020 til 2030, sí mynd II 16. Her sæst at barnatalið fær eitt topppunkt í 2027 upp á umleið 160 næmingar. Eru 10 næmingar pr. lærarastarv, krevur hetta 16 nýggj lærarastørv (sí talvu II 27). Samstundis vita vit frá talvu II 28, at í miðal hava 28 lærarar tikið prógv frá 2008 til 2020. Tískil hevur fólkaskúlin ikki avbjóðingar júst hesum viðvíkjandi.

Hetta verður tó sagt við tí fyrivarni, at ein fólkatalsframrokning fyri hendan aldursbólkin er tengd at stórari óvissu, vegna tvørrandi vitan um framtíðar burðartøl og konjunkturar.

## Starvsfólk á vælferðarøkinum komandi 10 árini

**Framrokning av skúlabarnatali 7-16 ár, 2020-2030** **Mynd II 16**




**Kelda:** Hagstovan

**Býti av starvsslag innan læraraøkið** **Talva II 29**

| | Lærartal |
|---|---:|
| **Kvinnur tilsamans** | **555** |
| Einalærari | 5 |
| Fyrstilærari | 11 |
| Lærari | 499 |
| Sergreinalærari | 5 |
| Skúlastjóri | 8 |
| Varaskúlastjóri | 19 |
| Vikarur | 8 |
| **Menn tilsamans** | **239** |
| Fyrstilærari | 3 |
| Lærari | 195 |
| Sergreinalærari | 5 |
| Skúlastjóri | 12 |
| Varaskúlastjóri | 14 |
| Vikarur | 10 |
| **Íalt tilsamans** | **794** |

**Kelda:** Mentamálaráðið

**Aldursbýti lærara** **Talva II 30**

| Aldurs.blk | Lærartal |
|---|---:|
| 20-30 | 31 |
| 30-40 | 186 |
| 40-50 | 277 |
| 50-60 | 178 |
| 60-70 | 117 |
| **Tils.** | **789** |

**Kelda:** Mentamálaráðið

Talva II 29 vísir seinasta býtið á lærarar og lærarinnur. Talvan vísir eisini, at kvinnur ikki eru líka væl umboðaðar í leiðarastørvum sum menn.

Talva II 30 um aldursbýti lærara bendir á, at nógvir lærarar lata seg pensionera í lutfalsliga ungum aldri. Hetta bendir á at lærarayrkið upplivist stressandi.

Ein hypotesa kundi verið, at tað er ein samanhangur millum vaksandi mistrivnaðin millum næmingar og økta pensioneringstíttleikan millum lærarar.

## II 7 Útbúgvingar føroyingar nema sær á vælferðarøkinum

Hetta stutta avsnitt gevur eitt yvirlit yvir, hvussu nógv eru útbúgvin og eru lesandi á vælferðarøkinum.

Tekstkassa 3 vísir hvussu nógv hava lokið sær útbúgving á vælferðarøkinum í Føroyum, og tekstkassi 4 vísir hvussu nógv føroysk lesandi vóru í útlondum innan vælferðarøkið skúlaárið 2019/20.

Tekstkassi 3: Yvirlit yvir hvussu nógv numu útbúgving á vælferðarøkinum í Føroyum

- Frá 2008 til 2019 hava 215 heilsurøktarar tikið prógv, hetta gevur í miðal 18 um árið.
- Frá 2008 til 2019 hava 370 heilsuhjálparar tikið prógv, hetta gevur í miðal 31 um árið.
- Frá 2008 til 2019 hava 203 sjúkrarøktarfrøðingar tikið prógv, hetta gevur í miðal 17 um árið.
- Frá 2008 til 2019 hava 315 námsfrøðingar tikið prógv, hetta gevur í miðal 26 um árið.
- Frá 2008 til 2019 hava 332 fólkaskúlalærarar tikið prógv, hetta gevur í miðal 28 um árið.

Tekstkassi 4: Yvirlit hvussu nógv føroysk lesandi numu útbúgving á vælferðarøkinum í útlondum

- Skúlaárið 2019/20 vóru tað 51, ið numu útbugving innan sjúkrarøktarfrøði.
- Skúlaárið 2019/20 vóru tað 41, ið numu útbúgving innan námsfrøði o.l.
- Skúlaárið 2019/20 vóru tað 33, ið numu útbúgving innan sálarfrøði.
- Skúlaárið 2019/20 vóru tað 20, ið numu útbúgving innan almannafaklig nám.
- Skúlaárið 2019/20 vóru tað 26, ið numu útbúgving innan fysioterapi.
- Skúlaárið 2019/20 vóru tað 16, ið numu útbúgving innan ergoterapi.
- Skúlaárið 2019/20 vóru tað 84, ið numu útbúgving innan læknafrøði.

Talva II 31 gevur eitt útdýpandi yvirlit fyri nám innan vælferðarøkið, ið føroyingar numu uttanlands skúlaárið 2019/2020.

Tað er áhugavert at síggja, at hesi nám hava eina yvirvág av kvinnum. Skúlaárið 2019/20 numu 237 sær eina útbúgving innan vælferðarøkið í Danmark, og 34 uttanfyri Danmark. Av hesum vóru 220 (81%) kvinnur og 51 (19%) menn.Tað er eitt gjøgnumgangandi mynstur, at fáir menn útbúgva seg á vælferðarøkinum. Eitt undantak er læknaútbúgvingin, ið hevur eitt javnari kynsbýtið enn hinar útbúgvingarnar í talvu II 31.

**Úrvald nám ið føroyingar numu uttanlands 2019/2020** **Talva II 31**

| Námsheiti | Kvinnur | Menn | Samlað |
|---|---|---|---|
| **Samlað í DK** | **196** | **41** | **237** |
| Afspændingspædagogik og psykomotorik, prof.bach. | 2 | 1 | 3 |
| Ergoterapi, prof.bach. | 16 | 0 | 16 |
| Fysioterapi, prof.bach. | 17 | 9 | 26 |
| Generel pædagogik, cand.pæd. | 2 | 0 | 2 |
| Medicin, bach. | 26 | 8 | 34 |
| Medicin, c.med. | 18 | 10 | 28 |
| Psykologi (komb. HUM), bach. | 1 | 0 | 1 |
| Psykologi (komb. HUM), cand.soc. | 0 | 1 | 1 |
| Psykologi (komb. NAT), bach. | 2 | 0 | 2 |
| Psykologi (komb. SAM), cand.soc. | 1 | 0 | 1 |
| Psykologi (RUC), cand.mag. | 0 | 1 | 1 |
| Psykologi, bach. | 7 | 1 | 8 |
| Psykologi, c.psych. | 4 | 1 | 5 |
| Psykologi-pædagogik, cand.psyk.pæd. (DPU) | 2 | 2 | 4 |
| Pædagog, prof.bach. | 21 | 5 | 26 |
| Pædagogik, bach. | 2 | 0 | 2 |
| Pædagogik, cand.pæd. (DPU) | 1 | 0 | 1 |
| Pædagogik, ivu (mvu) | 1 | 0 | 1 |
| Pædagogisk psykologi, cand.pæd. | 4 | 0 | 4 |
| Sociale interventionsstudier, cand.soc. | 1 | 0 | 1 |
| Socialrådgiver, prof.bach | 17 | 1 | 18 |
| Socialt arbejde, c.soc. | 1 | 0 | 1 |
| Sundhedsplejerske,diplomeksamen | 3 | 0 | 3 |
| Sygepleje, c.cur. | 2 | 0 | 2 |
| Sygeplejerske, prof.bach. | 45 | 1 | 46 |
| **Samlað uttanfyri DK** | **24** | **10** | **34** |
| Medicin, bach. | 1 | 0 | 1 |
| Medicin, c.med. | 14 | 7 | 21 |
| Psykologi (komb. HUM), bach. | 1 | 0 | 1 |
| Psykologi (komb. SAM), bach. | 1 | 0 | 1 |
| Psykologi, bach. | 4 | 2 | 6 |
| Psykologi, c.psych. | 0 | 1 | 1 |
| Psykologi, mag.art.psych. | 1 | 0 | 1 |
| Pædagog, prof.bach. | 2 | 0 | 2 |
| Íalt | **220** | **51** | **271** |

**Kelda:** Mentamálaráðið

## II 8 Keldur

Hagstova Føroya

Tórshavnar kommuna

Føroya gjaldstova

Almannaráðið

Landssjúkrhúsið

Leiðslukunningarskipanin

Almannaverkið

Klaksvíkar kommuna

Runavíkar kommuna

Mentamálaráðið

Studni